| | |
|---|---|
| **Býráðsfundir**<br>11. desember 2014 | Blað nr.: 11947 |
| | Formansins merki: |

**GERÐABÓK**

**Dato:** 11. desember 2014 **Kl**. 17:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 235/14-260/14

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Rúni Djurhuus
Sjúrður Johan Olsen
Sigrún Amalia Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**
Marius Müller
Jóan Petur Hentze

**LUTTÓKU IKKI:**
Elin Lindenskov

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

## MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00

### *235/14 Uppsamlingsmál ár 2014 : Býráðslimir - farloyvi 14 dagar ella meir*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 235/14 | 14/00934-15 |

**Málslýsing**:
Elin Lindenskov hevur boðað frá, at henni berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Rúni Djurhuus, eru loknar.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Samtykt.

# 236/14 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2014

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 8/14 | 14/01236-1 |
| 10 Býráðsfundir | 18.09.2014 | 182/14 | 14/01236-1 |
| 11 Fíggjarnevnd | 22.10.2014 | 260/14 | 14/01236-1 |
| 12 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 207/14 | 14/01236-1 |
| 13 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 310/14 | 14/01236-1 |
| 14 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 236/14 | 14/01236-1 |
| 2 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 30/14 | 14/01236-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.03.2014 | 48/14 | 14/01236-1 |
| 4 Býráðsfundir | 27.03.2014 | 52/14 | 14/01236-1 |
| 5 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 111/14 | 14/01236-1 |
| 6 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 83/14 | 14/01236-1 |
| 7 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 162/14 | 14/01236-1 |
| 8 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 133/14 | 14/01236-1 |
| 9 Fíggjarnevnd | 10.09.2014 | 220/14 | 14/01236-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 04. mars 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. mars 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 27. mars 2014:** Framlagt og gókent.

Roknskapurin fyri mars og apríl 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri mai 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri juni, juli og august 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 10. september 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 18. september 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri og september 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri oktober 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Framlagt og góðkent.

# 237/14 Føroya Forngripafelag : Umsókn at keypa grundøkið á matr. nr. 970k, Tórshavn so lagaliga sum møguligt, Hornagarður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 180/14 | 14/00336-17 |
| 2 Fíggjarnevnd | 10.09.2014 | 227/14 | 14/00336-17 |
| 3 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 312/14 | 14/00336-17 |
| 4 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 237/14 | 14/00336-17 |

**Lýsing av málinum- samandráttur:**
Í stuttorðaðum skrivi vendir Føroya Forngripafelag sær til TK.
Upplýst verður, at felagið hevur viðtikið at selja húsini hjá Hans á Lað, ið standa við Hornagarð á leigaðum grundøki hjá Tórshavnar Kommunu.
Ætlanin er at nýta peningin samsvarandi endamálum felagsins.
Felagið heitir á býráðið, um at lata felagnum grundøkið so lagaliga sum til ber.

**Aðrir upplýsingar í málinum:**
Grundøkið er til víddar 177 m². og fyriliggur 20 ára leigusáttmáli um leigu av økinum. Leigusáttmálin er undirskrivaður 21. apríl 1980.
Húsini eru í 1980, flutt á nevnda grundøki, sum er granni til Hornahúsini úti við Landsjúkrahúsið.
Sambært upplýsingum, so hevur Forngripafelagið tá fingið húsini til keyps fyri onki, men hevur síðani umvælt og dagført húsini og hevur eisini staðið fyri flyting av húsunum.

**Ymiskar ásetingar í leigusáttmálanum.**
Verandi leigusáttmáli hevur gildið í 20 ár, t.v.s. fram til 21.04.2000, tá ið hann kann uppsigast av báðum pørtum við eitt árs freist. Áseting er um at tað skulu vera samráðingar partanna millum um leingjan av leigumálinum í eitt nýtt áramálsskeið.
Brúkið av húsunum skal vera í samsvari við endamál Føroya Forngripafelags.
Sambært leigusáttmála kann møguligur keypari av húsunum yvirtaka leigumálið, treytað av húsini verða nýtt til sama endamál og endamál sum Tórshavnar Býráð kann góðkenna.

Uppfyllir keyparin ikki treytirnar frammanfyri og kann býráðið tessvegna ikki góðkenna hann sum leigara, skal kommunan yvirtaka húsini fyri eina upphædd, sum verður ásett av trimum metingarmonnum.
Í sínari fráboðan um sølu av húsunum vísir felagið til at endamálið við søluni er samsvarandi viðtøkum felagsins. Men verður onki konkret tó nevnt í hesum sambandi.

**Grein 2. í lóg felagsins. Verkevni felagsins er:**
1. at vekja ans fyri fornminnum Føroya, fyri bygningum og umhvørvum við antikvariskum, siðsøguligum og estetiskum virði og beinleiðis arbeiða fyri varðveiting av hesum.
2. í varðveitingararbeiðinum at útvega sær fastar ognir og umsita tær.
3. at vekja ans fyri forngripum og stuðla innsavningarvirksemi Føroya Fornminnisavns.

Sbr. grein 5 kann verkevni felagsins einans broytast og felagið takast av, um hetta verður samtykt á tveimum lógliga lýstum aðalfundum upp í slag. Verður felagið tikið av, ganga ognir tess til Føroya Fornminnisavn.

**Ásetingar í kommunustýrislógini og kunngerð viðv. sølu av kommunalum ognum:**
Sambært § 44 í kommunustýrislógini, kann kommunan ikki selja fasta ogn hjá kommununi, uttan so, at ognin frammanundan hevur verið boðin út alment.
Í kunngerð nr. 122 frá 22. december 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn eru ásettar nærri reglur um mannagongdina við almennum útboði av kommunalari fastogn.
Sí § 2. stk. 2. í kunngerðini nýtist fastogn tó ikki at verða boðin alment út, um talan er um sølu til felag, stovn v.m., sum kommunan lógliga kann veita stuðul,

**Niðurstøða:**
Í hesum føri hevur kommunan heimild til at selja ognina til Forngripafelagið.
Hinvegin ber eisini til hjá møguligum keypara at keypa húsini og samstundis at yvirtaka leigumálið, undir ávísum treytum. Millum annað at húsini skulu nýtast til sama endamál sum higartil, ella til endamál sum Tórshavnar Býráð kann góðkenna.

Ein møguligur vinningur sum forngripafelagið fær av eini sølu av grundøki við ástandandi sethúsum, verður brúktur til almannagagnligt virksemi.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og miðfyrisitingarstjórin mæla til at beina málið í avarandi nevndir.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2011:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. apríl 2011:** Nevndin samtykti at umsitingin lýsir málið til komandi fund.

**Ískoyti:**
Føroya Forngripafelag hevur umvælt húsini, sum standa á matr. nr. 970k.
Grundøkið er til víddar 177 m².
Forngripafelagið ætlar at selja húsini, og er tað felagsins metan, at tað er lættari at selja húsini um felagið eisini eigur undirlendið.
Ein møguligur vinningur av søluni, verður brúktur til varðveita aðrar ognir, sí eisini grein 2, í lóg felagsins.
Verður felagið tikið av, ganga ognir tess til Føroya Fornminnisfelag.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at beina málið í teknisku nevnd.

**Fíggjarnevndin 13. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til at bíða við at taka støðu til málið, til heildarætlan fyri LSH er liðug og góðkend, herundir eisini vegaføring á økinum.

**Tekniska nevnd 24. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Sambært fyriliggjandi uppskoti um vegaloysn til Kapellið, kemur verandi vegur at liggja nærri Hornahúsunum, meðan økið, har vegurin er í dag, gerst til p-pláss. Vegaloysnin við Landsverk og LSH kemur sostatt ikki at nerva matr. nr.970k, Tórshavn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til at beina málið aftur í fíggjarnevndina til støðutakan, við grundarlag í omanfyri standandi ískoyti.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at selja umsøkjara matr. nr. 970k, til marknaðarprís.

Virðismeting verður fingin til vega, og er ein møgulig søla av matriklinum, treytað av góðkenning frá fíggjarnevnd.

**Fíggjarnevnd 10. september 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og verður málið at leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

**Ískoyti**
Sp/f Ráð hevur virðismett ognina til kr. 265.500,00 svarandi til kr. 1.500 kr/m2.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundir**<br>11. desember 2014 | Blað nr.: 11954<br><br>Formansins merki: |

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at selja umsøkjara matr. nr. 970k, Tórshavn, fyri kr. 265.500,00 treytað av góðkenning frá Føroya Landstýri.

Keypari rindar metingarkostnað umframt aðrar kostnaðir sum tinglýsing og annað.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

# 238/14 Spæliðplássið hjá Dr. Ingridar Meinigheitsbarnagarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 05.02.2014 | 13/14 | 14/00619-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 13/14 | 14/00619-3 |
| 3 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 34/14 | 14/00619-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 75/14 | 14/00619-3 |
| 5 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 338/14 | 14/00619-3 |
| 6 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 238/14 | 14/00619-3 |

## Spæliplássið hjá Dr. Ingridar Meinigheitsbarnagarði

Dr. Ingridar Meinigheitsbarnagarður hevur víst kommununa á, at spæliplássið hevur átrokandi tørv á ábótum og dagføringum, men hevur stovnurin ikki fígging til hetta. Stovnurin vísir á, at spæliplássið verður ikki bert nýtt til virksemið í barnagarðinum, men er opið fyri almenninginum og verður nógv nýtt av børnum og familjum í miðbýarøkinum.

Dr. Ingridar Meinigheitsbarnagarður er sjálvsognarstovnur. Bæði bygningur og spæliøkið er tí ogn sjálvsognarstovnsins. Virksemið er hinvegin kommunalt skilt á tann hátt, at kommunan tillutar stovninum børn í ansing og fíggjar kommunala partin av kostnaðinum. Stovnurin krevur sjálvur inn foreldragjaldið.

Spæliplássið hjá stovninum er at rokna sum lutvíst alment í mun til, at tað er frítt hjá børnum og familjum at brúka. Tað eru harumframt ikki nógv líknandi spælipláss í miðbýnum. Kommunan kann tí sigast at hava ein áhuga í, at spæliplássið er í góðum standi og trygt, og tí verða við til at fíggja hetta.

Trivnaðarnevndin hevur ikki fígging til spælipláss. Í íløguætlanini fyri 2014 grein 6 teknisk mál er játtan sett av til spælipláss í miðbýnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildini mæla til, at trivnaðarnevndin heitir á teknisku nevnd um at viðgera møguleikan at fíggja dagføring av spæliplássinum av kontu 6275 spælipláss í miðbýnum.

**Trivnaðarnevndin 13. januar 2014:** Samtykt at viðgera málið saman við ætlanini at skipa stovnin kommunalan, sí mál 2013-0533.

**Trivnaðarnevndin 23. januar 2014:** Ein meirluti, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr og Tróndur Sigurðsson, taka undir við tilmælinum og beina málið í teknisku nevnd. Harumframt tekur meirilutin undir við at skipa stovnin kommunalan.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur ikki undir við tilmælinum, tí talan er kommunala íløgu í sjálvsognarstovn, sum er privatur, og tí eigur kommunan at hava yvirtikið stovnin, áðrenn íløgur verða gjørdar.

**Ískoyti:**
Talan er um prinsippielt mál, av tí at Trivnaðarnevndin á fundi 23. januar 2014 leggur upp til, at játta part av kommunala íløgukarminum til at gera íløgur í eini privatari ogn.

Tekniski stjórin vísti til ásetingarnar í §11 í kommunustýrisskipanini, og somuleiðis til 4. brot í játtanarreglunum.

Tekniski stjórin vísti til ásetingarnar í § 11 í kommunustýrisskipanini og somuleiðis til 4. brot í játtanarreglunum.

Løgdeildin greiddi frá løgfrøðiligu viðurskiftunum. Mett verður, at heimild er hjá kommununi at gjalda fyri viðlíkahaldsarbeiðinum í hesum førinum, um politisk undirtøka er fyri tí. Hetta grundað á, at kommunan hevur tætt tilknýti til stovnin, sosum at talan er um kommunalt ansingartilboð, at almenningurin hevur atgongd til økið, og at kommunan í fleiri ár hevur rindað stovninum eina árliga upphædd til viðlíkahald.

**Tekniska nevnd 5. februar 2014:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr og Helena D. à Neystabø, mælir til at taka undir við trivnaðarnevndini 23. januar 2014 og játta kr. 150.000,- til viðlíkahald av spæliplássinum.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, vísir til samtyktina í trivnaðarnevndini 13. Januar 2014 og mælir til at beina málið aftur í trivnaðarnevndina.

Ein annar minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.
Málið beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein mælir býráðnum frá at samtykkja málið, tí talan er um kommunala íløgu í sjálvsognarstovn, sum er privatur, og tí eigur kommunan at hava yvirtikið stovnin, áðrenn íløgur verða gjørdar.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 4. mars 2014:** Atkvøtt varð um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurdsson, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Sigrun Mohr, Elin Lindenskov og Bjørghild Djurhuus.

**Ískoyti:**
Sambært játtanar-reglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin ‘Spælipláss Dr. Ingridar barnagarður’, L62022, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest avlop álj. kr. 1.453,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið til kunningar.

Heðin Mortensen og Jógvan Arge luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt at lokað málið.

# 239/14 Serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging oman Mattalág - broyting av byggisamtykt (2013-1838)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 26.11.2014 | 282/14 | 14/00826-16 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 324/14 | 14/00826-16 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 239/14 | 14/00826-16 |

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Felagið Bústaðir, fyrrverandi Húsalánsgrunnurin, hevur ætlanir um at byggja leiguíbúðir á matr. nr. 897e og 897k, oman Mattalág í Tórshavn.

30. mai 2013 samtykti býráðið at broyta byggisamtyktina fyri ognirnar frá A1 til A3 øki fyri at gera tað møguligt at byggja íbúðir her (j.nr. 2013-1062).

Ætlanin er at byggja 34 íbúðir í ymiskum sniðum og støddum.
Sambært almennu byggisamtyktini kunnu útstykkingar í A3-øki bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

Í sambandi við projekteringina av ætlaðu byggingini, eru Bústaðir farnir undir at taka jørðprøvar inni á økinum. Komið er millum annað fram til, at kommunala høvuðskloakkin, ið liggur tvørtur ígjøgnum ognina og sum liggur rættiliga grunt, ikki lýkur teknisku ásetingarnar, tí leki er staðfestur. Talan er um eina ca. 55 metur langa ø500 betong-kloakkleiðing, sum treingir til dagføringar. Bústaðir ætla at umleggja hesa kloakkleiðing, tí hon kemur at nerva ætlaðu bygginginа.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað fyriliggur eitt tilboð, dagf. 21.08.2013, frá arbeiðstakara til Bústaðir uppá umleggjan av kloakkleiðingini. Talan er um umlegging av samanlagt 190 m og er samlaða tilboðið áljóðandi kr. 607.694,- u/mvg.

**Tilmæli:**
Vísandi til at kommunan hevur ábyrgd av øllum høvuðskloakkleiðignum og har talan er um gamlar leiðingar, ið treingja til at verða umlagdar ella dagførdar, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til, at kommunan fíggjar kostnaðin fyri umleggingina av hesi kloakkleiðing.
Mælt verður til at fíggja arbeiðið álj. kr. 700.000,- í sambandi við íløgukarmar fyri kloakkarbeiði í 2014 og annars at beina málið hesum viðvíkjandi í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 4. september 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Bogi Andreasen og Helena D. á Neystabø luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Sambært játtanar-reglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin ‘Høvuðskloakkering, íbúðarbygging oman Mattalág’, L68021, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest avlop álj. kr. 29.325,-.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 26. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt at lokað málið.

## 240/14 Nýggj spælipláss til børn í Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 12.02.2014 | 23/14 | 14/01046-4 |
| 2 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 197/14 | 14/01046-4 |
| 3 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 186/14 | 14/01046-4 |
| 4 Fíggjarnevnd | 10.09.2014 | 231/14 | 14/01046-4 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 55/14 | 14/01046-4 |
| 6 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 329/14 | 14/01046-4 |
| 7 Tekniska nevnd | | | 14/01046-4 |
| 8 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 240/14 | 14/01046-4 |

**Málslýsing:**

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Nevndin samtykti at heita á teknisku nevnd um at fyrireika 4 nýggj spælipláss til børn í Tórshavn.

**Ískoyti:**
9. juli 2012 teldupostur frá Innspark við tilboð um at veita smá spælipláss at seta saman við útifimi-tólunum á Glaðsheyggi, í Viðarlundini í Grið og í Nólsoy.

Tilboðini fevna um fýra ymisk tól miðalprísur er 116.330 kr/stk. við mvg, tilrigging, útgraving og planering. Serligt fallundirlag er ikki við í prísinum.

Um hesi spælipláss skula raðfestast í verandi fíggjarári 2013, krevur tað umraðfesting av ætlaðum arbeiðum á rakstrarkonto 6210.

**Tekniska nevnd 12. juni 2013:** Nevndin samtykti, at umsitingin ger uppskot til eitt spælipláss í Grasagarði fyri kr. 300 – 400 túsund av konto 6210.

**Mentamálanevndin 12. februar 2014:** Mentamálanevndin heitir enn einaferð á teknisku nevnd um at fyrireika spælipláss til børn í Tórshavn og at miðjað verður eftir, at tey verða klár at taka í nýtslu í summar.

- Forkvinnan ynskir umrøtt, hvussu spælipláss í miðbýnum kunnu verða skipað í mun til námsfrøðiliga, tað estetiska og undirhaldsvirðið í spæliplásspolitikkinum og møguleikan, at spæliplássini eru mannaði á onkran hátt við fólki við førleikum.

**Ískoyti:**
Vísandi til fleiri áheitanir og til ítøkiliga umsókn frá 2008 um at skipa eitt spælipláss í miðbýnum, verður við hesum sent nevndum til viðgerðar, at skipa eitt størri spælipláss í miðbýnum.

Eitt spælipláss við dagligari fastari manning. Eitt pláss undir eftirliti, ið kann læsast um náttina.

Málið hevur verið frammi á býarskipanardeildini, og okkurt uppskot um skipan er komið uttanífrá, sum tó ikki verður mett egna í verandi líki.

Býarskipanardeildin er biðin um at fáa til vega uppskot at bjóða út og avsettar eru 850.000 kr. á íløgum FÆ2014, til Spælipláss í miðbýnum.

Grasagarður millum Steinatún og Kongagøtu verður mett áhugavert øki mitt í býnum. Uml. 2.200 m² til víddar og fevnir um partar av matriklunum 335,337,338. Á matriklunum eru skúlatannlæknastovan og “Tilhaldið” . Savningarstaður hjá teimum eldru í býnum. Økið var fyrr tveir vakrir urtagarðar, við høgum grótlaðaðum grótgørðum uttanum. Seinnu árini eru garðarnir lagdir saman, gøtur skipaðar, grótgarðar lækkaðir, og verður økið nú nýtt til uppihald, gjøgnumgongd og ymisk tiltøk, barnafagnað, brúðarvígslu, topp-popp konsertir Hátíðarhald fyri pisum á Føroya Handilsskúla, er vorðið ein fastur árligur táttur í juni. Umframt at økið verður brúkt til ótálmaðan drykkjuskap, graffiti máling og hissini sproytur. Ofta ótespiligt aftaná vikuskiftir.

Á økinum eru stór gomul vøkur trø, mest ahorn, umframt runnar av ymiskum slag, blómur, staudir og grasvøllir. Í miðbýnum er av bestu vakstarmøguleikum og hartil veðurgott.

Størstu amparnir eru larmur frá ferðsluni í Steinatúni, manglandi drening av grasvøllunum og ólevnaður.

Býarskipanardeildin mælir til at staðseta spæliplássið “GRASAGARÐUR” á nevndu matriklar, at byggja umsitingarhús við WC, skipa økið til spæl, ísbreyt um veturin, ítriv og uppihald. At økið er mannað við fakfólki, pedagogum og serfrøðingum innan motorikk hjá børnum. At økið verður girt inni og upplatingartíðirnar eru 07.00 - 22.00 á sumri og 10.00 – 20.00 á vetri. At játta kr. 850.000 kr. av FÆ2014 til projektering, drening, aðra fyrireiking og serkøna hjálp.

Harumframt verður mælt til at raðfesta fasta upphædd á fíggjarætlan komandi árini til rakstur og viðlíkahald kr. 400.000 av hesum nýggja rakstrarstaðnum, og 500.000 kr. árliga í nøkru ár til framhaldandi útbygging.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarskipanardeildin mælir nevndini til at samtykkja omanfyri standandi, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at staðseta spæliplássið “GRASAGARÐUR” á nevndu matriklar, at gera uppskot um bygging av umsitingarhúsi við WC, skipa økið til spæl, ítriv og uppihald at leggja fyri nevndina aftur, og at játta kr. 850.000 av FÆ2014 til projektering, drening og aðra fyrireiking. Málið beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 10. september 2014:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanar nevndina.

**Ískoyti:**
Vísandi til omanfyri standandi samtyktir, so hava fundir verið innanhýsis um, at skipa økið til spæl og ítriv hjá børnum út frá teimum nýggjastu pedagokisku prinsippunum, ið stuðla undir menning og motorikk hjá børnum. Ì hesum hevur deildin leita sær ráð hjá serfrøðingum á deildini børn og ung. Ásannandi tað, at lata børnini spæla sjálvi í frið í tryggum og mennandi umhvørvi, og at tey vaksnu blanda seg sum minst uppí. Á tann hátt lata sansirnar kveikjast og vekjast og motorikkin mennast.

Nakað av forarbeiði er gjørt, t.d. økið er býtt upp í partar hvørt við sínum eyðkennum, fyrimunum og vansum.

Fyri at skipa økini til spæl, sum omanfyri er ætlað, er neyðugt við umfatandi drenings- og lendisarbeiði.

Nú er vend at vera komin í, og ynski er um at gera eitt «klassiskt» spæliøki við spælitólum.

Eitt uppskot er komið inn frá veitaranum sp/f INNSPARK, áljóðandi umleið 1 mill. kr. Mett verður at arbeiðið eigur at bjóðast út til fleiri veitarar, tá tað kemur hartil.

Víst verður til júst samtykta innkeyps- og útboðspolitikkin hjá Tórshavnar kommunu, «Yvirskipaða endamálið við innkeyps- og útboðspolitikkinum er, at peningur skattgjaldarans verður nýttur so effektivt sum gjørligt, og at innkeyp og útboð í Tórshavnar Kommunu fer fram eftir meginreglum, sum tryggja effektivitet, gjøgnumskygni og eins viðferð av veitarum.»

Fyri at kunna skipa nøkur øki er neyðugt at vita meira ítøkiliga hvør málsetningurin er,
Og undir hesum at vita um:

1. Skal økið fevna um allan tann gamla urtagarðin, ella bert ein part. Valt verður at fevna um tvey øki, báðar verandi grasplenurnar
2. Skal pavilliongin takast niðu? Nei, tí hon kann helst brúkast at festa klatrinet á.
3. Skal trappa gerast uppá Kongagøtu. Nei, tí ætlanin við kommunuskúlanum er ikki greið enn.
4. Skal økið samskipast við framtíðar virksemi í kommunuskúlanum. Nei, tað verður at bíða til seinni, sí omanfyri
5. Skula gøturnar festast.. asfalt ella flísar. Ja, asfalt er helst tað ódýrasta.

Bindingar eru:

- Serstaka byggisamtyktin nr. 12 um at økið B. Skal skipast sum almennur urtagarður. Spurningur um samstyktin skal broytast. Mett verður at garðurin framvegis kann metast sum ein «urtagarður».
- Miðbýarætlanin og tann ætlaða skipanin av ferðsluni í økinum. Kemur at ávirka ferðslumynstrið nakað. Verður lagað til tað, tá tað er greitt.
- Drening av øki, vatntrupulleikar at loysa, tí nógv vatn rennur oman gjøgnum garðin, tá tað regnar.
- Burturgrevstur av verandi tilfari, mold v.m. og tilkoyring av nýggjum stabilum tilfari.
- Stóru trøini skugga nógv um summari, har má skerast niður og tað skal vera við skili.
- Logistikkur tá arbeitt verður, Kongagøta ella Steinatún, kranar, lastbilar, sperring av ferðslu, skúlagarðurin í Kongagøtu, v.m.
- Játtanin er bert 850.000 kr.

<u>Uppskot til leist:</u>

- Valt er at grava moldina burtur av verandi grasplenum, uml. 400 $m^2$ byggja tær uppaftur við stabilum tilfari og sandi uml. 250.000 kr.
- Drening av økinum og legging av brunnum og rørum uml. 100 m og 5 brunnar 100.000 kr.
- At bjóða veiting av spælitólum út til tveir veitarar

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at taka undir við uppskotinum og at beina málið, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina, til býráðið, og at játta 850.000 kr. av fíggjarkarminum til spælipláss.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundir**<br>11. desember 2014 | Blað nr.: 11963<br>Formansins merki: |

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt við teiri viðmerking, at bjóða út til fleiri veitarar.

# 241/14 Kampingplássið Yviri við Strond matr. nr. 672a, Tórshavn (Campingpláss) (2011-2166)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 63/14 | 14/01418-39 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 336/14 | 14/01418-39 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 241/14 | 14/01418-39 |

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Útvegan og uppsetan av nýggjum bygningum til kampingvirksemi og tænastur til ferðafólk.

Verandi kampingpláss varð sett á stovn í 1980-81. Kampingskúrarnir til W.C. og baðirúm. Hetta vórðu byggiskúrar sum byggifelagið Guttesen og Staksberg tá bygdu. Síðani er bygdur ein skúrur aftrat til konufólk og køk, matgerð og matstovu. Húsini ella skúrarnir eru nú millum 30 og 20 ára gamlir, og hóast gott viðlíkahald eru teir ikki tíðarhóskandi og krevja størri og størri umvælingar. Ikki er sørt at vitjandi úr útlondum viðmerkja, at umstøðurnar eru vánaligar.

Tórshavnar kommuna eigur økið matr. nr. 672a, samlað vídd á matrikli 27505 m²
Byggisamtykt D1.

Tekningar eru við fasadum og innrætting hevur býararkitekturin latið gera. Bygningurin er staðsettur á sama øki sum verandi. Tað er tað besta, havandi friðingarmynduleikan í huga. Ætlan er at keypa lidnar pavilliongir. Nýggjur rottangi skal setast upp og bindast í skipaða kloakk í vegnum.

Í fíggjarætlanini fyri 2012 eru avsettar kr. 3,0 mió á kto 6275 Fríðkan av kommununi, harav umsitingin í sambandi við framløguna av fíggjarætlanaruppskotinum mælti til at nýta kr. 1,0 mió til nýggjar bygningar á staðnum. Ein neyvari meting sigur tó, at kostnaðurin fyri nýggjar bygningar og kloakk-/rottangaviðurskifti, væntast at kosta uml. 1,5 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini at taka undir við uppskotinum, og at játta kr. 1,5 mió av kto 6275 til nýggjar bygningar og broyting av rottanga v.m. á kampingplássinum Yviri við Strond, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndn 26. apríl 2012:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jògvan Arge, Elin Lindenskov og Sjúrður Olsen, mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðið 2. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**-Ískoyti.**
Vísandi til at kampingplássið liggur í D1, hevur ivamál stungið seg upp, um loyvi at gera broytingar og byggja nýtt. Verandi bygningar eru 30 og 20 ára gamlir og í ringum standi. Byggiloyvi krevst til dagføring av krøvum, plásskrøv, rýmingarleiðum, avlamisviðurskiftum,

atkomu fyri rullistólabrúkarum v.m. Neyðugt verður at ríva verandi hús niður og at byggja nýtt. ì hesum sambandi verður samlaða húsavíddin 140 m² móti verandi 72 m².

Arbeitt hevur verið við at skipa eitt kampingpláss á øðrum staði, men er henda íløgan so stór, at einki verður gjørt fyribils. Tí verður søkt um at fáa fyribilsloyvi og frávik frá byggisamtyktini til at byggja nýtt. Bygt verður sambært hjáløgdu tekningum.

Væntað verður, at tað kann nøkta tørvin í eitt 10 ára skeið til 2023.
Loyvi krevst frá náttúrufriðingarmyndugleikunum um bygging nær sjóvarmálan.

Tá nýggjur skúrur varð bygdur aftrat i 1986, vóru loyvi fingin til vega frá Náttúrufriðingarnevndini og frá Yvirfriðingarnevndini dagfest 22. august 1986. Býráðsmál nr. 34/7 1981.

Umsitingin hevur eisini arbeitt víðari við tekningum av byggingini, og hevur gjørt nakrar broytingar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggideildini mæla nevndini til at góðkenna fyriliggjandi prosjekt, og at játta byggiloyvi sum frávik, sambært innsendu tekningum, treytað av góðkenning frá friðingarmyndugleikunum.

Somuleiðis verður mælt til at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út í innbodnari arbeiðstøku.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum treytað av at bygningurin verður fluttur minst 2,5 m frá vegnum.

**Ískoyti:**
Arbeiðstakararnir Djóni í Geil Johansen, timburmeistari og Valbjørn Dalsgarð, timburmeistari eru bodnir til undirhondsboð. Tilboðini verða handað Tórshavnar kommunu tann 25. februar 2013, og verða løgd fram til nevndarfundin.

Tilmæli kemur til fundin.

**-Ískoyti:**
Friðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu hevur á fundi hin 7. jan. 2013 givið játtandi loyvi til byggingina, treytað av góðkenning frá Yvirfriðingarnevndini.

Yvirfriðingarnevndin hevur á fundi 19. febr. 2013 staðfest avgerðina hjá Friðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu.

Byggiloyvi er síðani útskrivað hin 25. febr. 2013.

Arbeiðstakararnir Djóni í Geil Johansen timburmeistari og Valbjørn Dalsgarð timburmeistari vóru bodnir at lata inn undirhondsboð. Tilboðini vórðu handað Tórshavnar Kommunu tann 25. februar 2013.
Tilboðið frá Djóna í Geil Johansen er áljóðandi: 2,098,737,00 kr uttan mvg.

Tilboðið frá Valbjørn Dalsgarð er áljóðandi: 3.833.687,00 kr uttan mvg.

Um tikið verður av lægsta tilboðnum, verður samlaði kostnaðurin fyri Kampingplássið Yviri við Strond áljóðandi: **2.831.983,00 kr**, íroknað óvæntað, eftirlit, og 6,25% í mvg.

Avsettar eru kr. 1,5 mió. á fíggjarætlanini fyri 2012 til verkætlanina. Írestandi fíggjartørvurin er sostatt áljóðandi: **1.331.983,00 kr.**

Spurningurin um hvørjir møguleikar eru at útvega írestandi fíggingina er viðgjørdur av stjórnini, saman við Fíggjardeildini, og verður víst á henda møguleika:

| | | |
|---|---|---|
| FÆ 2012 til kampingpláss | konto 6275, L62005 | 1.500.000 |
| Flyting frá FÆ2012 Boðanesgjógv mentanarøki | konto 5375 | 1.000.000 |
| Flyting frá FÆ2012 Skálatrøð framtíðarætlan | konto 5375 | 340.000 |
| | | **2.840.000** |

Viðv. tíðarætlan hava báðir tilboðsgevarar upplýst, at byggingin væntast at taka umleið 4 mánaðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at spurningurin um fígging, herundir írestandi fíggingina, verður tikin upp til politiska viðgerð, og at málið verður beint til mentamálanevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í mentamálanevndina, fíggjarnevndina og býráðið.
Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø, mælir frá at finna írestandi fíggingina á mentanarøkinum.

**Ískoyti:**
Sambært játtanar-reglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin 'Kampingplássið yviri við Strond', L62005, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest avlop álj. kr. 889,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið til kunningar.

Heðin Mortensen og Jógvan Arge luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt at lokað málið.

# 242/14 Nýggjar Eigarafelagsviðtøkur. Eigarafelagið Heimasta Horn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 316/14 | 14/04937-2 |
| 2 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 242/14 | 14/04937-2 |

**Málslýsing:**
Advokatfelagið, hevur sent kommununi broyttar viðtøkur fyri Eigarafelagið Heimasta Horn, soleiðis sum hesar eru góðkendar á aðalfundi í felagnum 12. mars 2014. Sí skjal nr. 14/04937–1.

Sambært grein 22 í viðtøkunum framgongur, at skjalið verður at tinglýsa sum servituttur á matr. nr. 1119d, 1119e, 1119f, Tórshavn.

Átalurætt hevur eigarafelagið við nevndini og ein og hvør íbúðareigari umframt Tórshavnar kommuna.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla fíggjarnevndini og býráðnum til at góðkenna broyttu viðtøkurnar, sí skjal nr. 14/04937-1, og at broyttu viðtøkurnar verða tinglýstar á ognirnar.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

## 243/14 Kloakkútlop við Rættargøtu á Argjum (Sjósavnið) (2012-0026)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 26.11.2014 | 278/14 | 14/01991-22 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 321/14 | 14/01991-22 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 243/14 | 14/01991-22 |

**Lýsing av málinum:**
Av tí at kloakkin, sum rennur frá reinsiverkinum við Rættargøtu á Argjum, og leiðingin frá Norðasta Horni, liggur rættiliga tætt við Sandagerð, sum er eitt stað ið nógv verður nýtt sum frítíðarstað og sum grindavág, verður neyðugt at leingja kloakklopið út á fjørðin uml. 50 m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Biðið verður um kr. 200.000 av játtanini fyri íløgur í 2012 til projektering og útbjóðing, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión. Víst verður annars til skjal 2012-0026/1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildin mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 12. januar 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, at leggja fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin hildin 12. juni 2012 kl. 14.00. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol, saman við ráðgeva, j. nr. 2012-0026/5.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr, 2012-0026/6. verður samlaði fíggjartørvurin fyri projektinum kr. 591.728,-. Býráðið hevur 26. januar 2012 játtað kr. 200.000,- til projektering og útbjóðing. Sostatat er fíggjartørvurin kr. 391.728,-.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta 0,4 mió. kr. av íløgum fyri kloakkir í 2012, §6, 6875 og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

## Ískoyti:

Sum kunnugt var lisitatión var hildin 12. juni 2012, kl. 14.00, og var úrslitið fylgjandi:

| Arbeiðstakari | Tilboðsupphædd (u/mvg) | Alternativt tilboð (u/mvg) | Fyrivarni |
|---|---|---|---|
| Robbie Brockie | onki boð | | |
| Plan v/Jóannes Hellisdal | kr. 597.800 | | |
| Maskingrevstur v/Frank Hellisdal | kr. 291.900 | | |
| Andrias Berg | onki boð | | |
| Maskinkoyring v/Karl Patursson | avboð/onki boð | | |
| Articon | kr. 875.030 | | |
| J&K. Petersen | kr. 979.994 | | |

Metingin var kr. 490.000,- (u/mvg).

Farið var undir at gera sáttmála við sp/f Maskingrevstur, men í sambandi við liðuggerð av kloakkarbeiðinum var staðfest, at leiðingin við Rættargøtu var ikki sum upplýst, og kundi arbeiðið tí ikki gerast liðugt. Ráðgevarin saman við TK er komnir til ta niðurstøðu, at broyta uppá prosjektið og hevur hetta ein meirkostnað. Umsitingin hevur í hesum sambandi móttikið ískoytistilboð frá sp/f Maskingrevstur, álj. kr. 218.040,- (víst verður til j. nr. 2012-0026/17).

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaða arbeiðið kemur at kosta uml kr. 0,4 mio. afturat áður játtaðari upphædd álj 0,4 mió. kr. sambært býráðssamtykt 28. Juni 2012. Víst veðrur til skjal nr. 2012-0026/18. Samlaði kostnaðurin fyri hetta arbeiðið gerst sostatt uml. 0,8 mió. kr.

Nú tað fyriliggur tøkur framfluttur íløgukarmur innan §6, kto 6875 kloakkir, er rúm fyri at fara undir framhald av arbeiðinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at takað av ískoytistilboðnum frá Maskingrevstur, og at játta kr. 0,4 mió. av framfluttum íløgukarmi 6875-L00002, til kto. 6875, L68011, og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 9. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Ískoyti:**
Sambært játtanar-reglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin 'Kloakkútlop við Rættargøtu á Argjum', L68011, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest avlop álj. kr. 1.232,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 26. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt at lokað málið.

# 244/14 Kloakkútlop í bátahavnina á Argjum (2012-0027)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 26.11.2014 | 279/14 | 14/01992-20 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 322/14 | 14/01992-20 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 244/14 | 14/01992-20 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við løggilding av kloakkini í Tórshavnar kommunu verður neyðugt at flyta kloakkina, sum nú rennur í bátahavnina, út um grótkastið, so hylurin verður reinur fyri kloakkvatn.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Biðið verður um kr. 300.000 av játtanini fyri íløgur 2012 til projektering og uppmáting, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión Víst verður annars til skjal 2012-0027/1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildin mæla til at játta kr. 300.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 12. januar 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, at leggja fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 300.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin hildin 12. juni 2012, kl. 14.00. Umsitingin hevur latið gera lisitatiónsprotokol, saman við ráðgeva, . j.nr. 2012-0027/5.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Sambært fíggjarligu uppgerð, j. nr. 2012-0027/6, verður samlaði fíggjartørvurin fyri projektinum kr. 1.966.631,-. Býráðið hevur 26. januar 2012 játtað kr. 300.000,- til projektering og útbjóðing. Sostatt er fíggjartørvurin kr. 1.666.631,-.

**Tilmæli:**
Býraverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta 1.7 mió. kr. av íløgum fyri kloakkir í 2012, §6, 6875 og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 25. juni 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Ískoyti:**
Sambært játtanar-reglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin ‘Kloakkútlop í bátahavnina á Argjum’, L68012, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest avlop álj. kr. 11.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 26. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt at lokað málið.

# 245/14 Kloakk fram við Hoydalsá - Óluvugøtu - Svartafoss (2012-0028)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 26.11.2014 | 280/14 | 14/01993-32 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 323/14 | 14/01993-32 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 245/14 | 14/01993-32 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við reinsan av Hoydalsá manglar nú kloakkin frá Óluvugøtu-Svartafossi at verða gjørd, fyri at áin á hesum staðnum verður rein.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Biðið verður um kr. 200.000 til projektering og kanningararbeiði, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión Víst verður annars til skjal 2012-0028/1.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildin mæla til at játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 12. januar 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, at leggja fyri býráðið, um fíggjarnevndina.

**Figgjarnevndin 18. januar 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 200.000,- av íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012 til projektering og útbjóðing.

**Býráðið 26. januar 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Lisitatión var hildin tann 24. apríl 2012, og inn komu 4 tilboð. (Listitatiónsprotokol j. nr. 2012-0028/6).

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Higartil eru fíggjaðar kr. 200.000,- til projektering. Við støði í lisitatiónsúrslitinum verður írestandi fíggjartørvur álj. kr. 980.000,- sambært skjali nr. 2012-0028/7. Sostatt er samlaði fíggjartørvurin kr. 1.180.000,-

Sambært íløguætlanini fyri kloakkir 2012 eru settar 7 mió. kr. av til ymsar verkætlanir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin, leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at taka við lægsta tilboðnum frá Sp/f Andrias Berg og játta kr. 980.000 til kto. §6, 6875, L68013. Mælt verður eisin til at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 22. mai 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. mai 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 31. mai 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við reinsan av Hoydalsá manglar nú kloakkin frá Óluvugøtu-Svartafossi at verða gjørd, fyri at áin á hesum staðnum verður rein.
Av tí at TK ikki slapp at leggja kloakkleiðingina gjøgnum ognina hjá Kartna Winther, og býráðið hevur avgjørt ikki at keypa ognina (sí skjal 2012-2383/21), er alternativ loysn fingin til vega frá prosjekterandi og tilboð frá Sp/f Andrias Berg

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Biðið verður um kr. 0,5 mió. til at gera arbeiðið liðugt í sambandi við at teinurin verður broyttur. Víst verður annars til skjal 2012-0028/24.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 0,5 mill av framfluttum íløgum fyri kloakkarbeiði í 2012, til kto. § 6, 6875, L68013.
Mælt verður eisin til at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 28. november 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Sambært játtanar-reglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin ‘Kloakk fram við Hoydalsá, Óluvugøta-Svartafoss’, L68013, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest avlop álj. kr. 50.796,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Tekniska nevnd 26. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt at lokað málið.

# 246/14 Útiøki hjá skúlum í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 07.05.2014 | 86/14 | 14/02822-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 211/14 | 14/02822-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 05.11.2014 | 220/14 | 14/02822-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 229/14 | 14/02822-1 |
| 5 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 325/14 | 14/02822-1 |
| 6 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 246/14 | 14/02822-1 |
| 7 Mentamálanevndin | | | 14/02822-1 |

## Málslýsing:
Tilfar kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 7. mai 2014:** Útsett.

Mentamálanevndin 20. oktober 2014: Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Eitt gott útiøki i skúlunum hevur stóran týdning fyri menning og trivnað hjá næmingunum. Í mai 2014 varð gjørd ein støðu- og tørvslýsing av útiøkjum hjá nøkrum av skúlunum í kommununi. Sambært henni  er tørvar á umvælingum, útgerð og nýgerð í skúlagørðum í Tórshavnar kommunu.

Mentamálanevndin hevur samtykt ein yvirskipaðan skúlapolitikk (mál 2007-0504/4). Har stendur um útiøkið: "Uttanduraøkini og skúlagarðurin skulu verða kveikjandi og mennandi við tí í hyggju at stimbra samspælið við skúlans undirvísingarvirksemi." Í yvirskipaða skúlapolitikkinum verður eisini nevnt, at umstøðurnar til sosiala samveru skulu vera góðar.

Útiøkini í skúlum eiga at vera góður karmur um spæl, rørslu og uttandura læringsrúm. Tað er umráðandi, at útiøki er stimbrandi fyri næmingin, gevur honum avbjóðingar og stuðlar honum í at røra seg. Hetta hevur týdning fyri trivnað, læru, motorik, vælveru og heilsu hjá tí einstaka.

Við støði í støðu- og tørvslýsingini hevur umsitingin gjørt uppskot til arbeiðsætlan fyri komandi árini, og hvat hetta er mett at kosta.

| | 2015 | 2016 | 2017 | |
|---|---|---|---|---|
| Skúlin á Argjahamri | 1.100.000 | | 400.000 | |
| Venjingarskúlin | 300.000 | | | |
| Sankta Frans skúli | 100.000 | | | |
| Eysturskúlin | | 500.000 | 300.000 | |
| Velbastaðar skúli | | 500.000 | 50.000 | |
| Hoyvíkar skúli | | 250.000 | | |
| | | | | |
| Tilsamans | **1.500.000** | **1.250.000** | **750.000** | **3.500.000** |

**Skúlin á Argjahamri**
Parturin av útiøkinum hjá Skúlanum á Argjahamri, sum er gjørt, er gott, men ov lítið til so nógvar næmingar.

Eitt uppskot er gjørt at gera garðin garðsbúnan, og gera økið klárt til, at ymisk spæliamboð t.d. til at klintra í kunnu setast upp. Uppskotið, sum er frá Hjálpirót, er lagt fram á skúlastýrisfundi og fundi í námsfrøðiliga ráðnum.

Sambært uppskotinum skulu ymsu útiøkini bindast saman við gøtuskipan, soleiðis at sambandið millum skúlan og fríøkið verður betri. Tað skal eisini plantast í økið fyri at skapa lívd og fríðka um, men neyðugt er at velja harðbalnar plantur, tí økið liggur høgt og har er opið fyri.

Eyka moldlag  skal leggjast á skráarnar, so plantast kann í teir. Ymsu økini verða gjørd til spælipláss.

Kostnaðarmetingin arbeiðið og útgerð er 1.440.000 kr. Henda kann spjaðast yvir tvey ár, t.d. 2015 og 2017.

**Venjingarskúlin**
Útiøkið hjá Venjingarskúlanum er bert og ikki nóg væl egnað til uttanduravirksemi.

Skúlastýrið í Venjingarskúlanum hevur i umsókn dagfest 2. desember 2013 biðið um játtan til útiøkið. Námsfrøðiliga ráðið í Venjingarskúlanum hevur eisini havt evnið á skrá og viðgjørt støðuna við útiøkinum nakrar ferðir. Skúlin er í ferð við at gera eina miðvísa ætlan, sum skal økja  um trivnað og rørslu hjá næmingunum. Ikki minst í hesum sambandi er umráðandi, at umstøðurnar uttandura eru góðar og mennandi fyri næmingarnar.

Foreldraumboðini og starvsfólkaumboðið í skúlastýrinum meta ætlanina hjá leiðsluni og námsfrøðiliga ráðnum í Venjingarskúlanum vera eitt sera gott átak, og heita tí á Tórshavnar kommunu at veita Venjingarskúlanum eina eykajáttan á 300.000 kr., sum skal brúkast til at menna útiøkið.

**Sankta Frans skúli**
Í august 2011 varð nýggi smábarnaskúlin tikin í nýtslu. Skúlagarðurin var tá illa farin av maskinum, sum vórðu brúktar í sambandi við útgrevsturin. Sostatt eigur garðurin at verða asfalteraður. Asfaltið i niðara garðinum er farið í støðum, so hann treingir til ábøtur.

Kostnaðarmeting fyri at asfaltera ovara skúlagarð og gera ábøtur á garðin er 100.000 kr.

**Eysturskúlin**
Vestanfyri Eysturskúlan við a-lonina er sokallaða grøna økið. Einki er gjørt við hetta økið, tað er ikki drenað og eingin girðing er. Hurðar eru í  øllum stovunum í a-lonini út í grøna økið. Ein gøta er fram við skúlanum millum Tórgarðsgøtu og Djóna í Geil gøtu.

Í 2006 var eitt uppskot gjørt fyri grøna økið, kostnaðrmetetingin er 1.000.000 kr. Verður uppskotið sett í verk, kann økið nýtast til skúlagarð og til undirvísing, tað ber til t.d. væl til at brúka í lærugreinum sum náttúru og tøkni, lívfrøði og heimstaðarlæru.

**Velbastaðar skúli**
Skúlagarðurin hjá Velbastaðar skúla verður mest brúktur til bóltspæl, og tá bóltspæl er í garðinum, ber illa til at annað virksemi er eisini. Skúlastýrið hevur saman við skúlanum víst á,

at neyðugt er at býta skúlagarðin sundur fyri at skapa møguleika fyri fjølbroyttum virksemi í økinum.

Eitt uppskot frá skúlastýrinum og skúlanum er, at uml. helvtin av garðinum verður sparkivøllur við graslíki. Eingin sparkivøllur er á Velbastað, so ein sparkivøllur í skúlagarðinum verður óivað nógv brúktur – eisini eftir skúlatíð.

Kostnaðarmetingin er uml. 500.000 kr.

**Hoyvíkar skúli**
Útiøkini hjá Hoyvíkar skúla eru bygd upp soleiðis, at tey skapa umstøður fyri fjølbroytni, soleiðis at næmingar kunnu fáa hóskandi avbjóðingar í fríløtum, og tað ber eisini til at brúka partar av útiøkinum í undirvísing. Men har manglar útgerð.

Næmingar í Hoyvíkar skúla høvdu á vári 2014 evnisviku um trivnað, og í tí sambandinum hava næmingarnir fingið spurnarblað við heim um, hvussu teir trívast. Niðurstøðan er, at trivnaðurin er góður, men tey ynskja sær útgerð í skúlagarðin.

Mælt verður til at játta 250.000 kr. til útgerð til skúlagarðin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til prinsipiella viðgerð.

**Mentamálanevndin 05. november 2014:** Samtykt at kanna møguleikar fyri fígging, at leggja fyri nevndina aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til fígging kr. 1,5 mió fyri árið 2015 sum fyrsta stig samsvarandi yvirltinum omanfyri. Mett verður skilabest at skipa játtanina sum rakstrarjáttan, sum mentamáladeildin umsitur samsvarandi teirri raðfesting, ið mentamálanevndin ger.

Uppskot til fígging: kr. 1 mió av íløgukontu 5775 L57016 Golfvøllur, og kr. 0,5 mió av stuðulskontu 5370 Stuðul til íløgur.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Samtykt at taka undir við uppskoti til fígging og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina. Málið um raðfesting av arbeiðum verður viðgjørt seinni.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við mentamalanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Marin Katrinu Frýdal, um heldur enn at játtað 1. mió av íløgukonto Golfvøllur, at játta arbeiði av íløgujáttan Fótbóltsvøllurin í Hoyvík.

Fyri atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

## 247/14 Jóhan av Reyni : Fyrispurningur vegna íbúgvar í Varðagøtu um tað er møguligt at skifta bústaðarnavn til Varðatún

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Gøtunavnanevnd | 03.11.2014 | 1/14 | 14/02906-5 |
| 2 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 237/14 | 14/02906-5 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 247/14 | 14/02906-5 |

Málslýsing:
Áheitan er komin frá Jóhan av Reyni viðv. at fáa nýtt gøtunavn til húsini á Varðagøtu 79-81, her eru 6 hús í alt.
Hann skrivar at tað hevur verið meiningin frá byrjan av projektinum, at tað skuldi eita Varðatún og hetta navnið ynskja tey at fáa, og vísa eisini á onnur nøvn fyri smáu býlingarnir á Varðagøtu, eitt nú Varðabúð, Varðabrekka o.s.fr.

**Gøtunavnanevnd 03. november 2014:** Nevndin tekur undir við, at Varðagøta 79-81 verður broytt til Varðatún.

**Tilmæli:**
Trivnaðastjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum hjá gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

# 248/14 Sjálvsognarstovnurin Gamla Hospital

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 26.11.2014 | 230/14 | 14/03603-25 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 326/14 | 14/03603-25 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 248/14 | 14/03603-25 |

## Málslýsing:

**Umsókn frá Sjálvsognarstovninum Gamla Hospital um stuðul2007-2965**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í skrivinum verður m.a. skrivað:

"Síðani býráðið í fjør játtaði verkætlanini stuðul hevur borið til at arbeitt miðvíst við endurbyggingini, og ætlanin er nú at reisa tann partin, sum á sinni varð tikin niður í sambandi við útbygging á skipasmiðjuni. Tá verður bygningurin heilur, og arbeiðið uttan kann gerast liðugt, so at hann verður eitt prýði, har hann stendur.

Hetta krevur pening, og vit skiltu á mentamálanevndini, at hon var sinnað at umhugsa stuðul til tað framhaldandi arbeiði, tá ið tað sást, hvussu arbeiðið leið. Tí loyva vit okkum at venda aftur til málið og heita á býráðið um at viðgera umsókn okkara av nýggjum. Vit vísa her til kostnaðarætlanina, sum varð send býráðnum saman við umsóknini í fjør.

Vit kunnu upplýsa, at stovnurin hevur umhugsað spurningin, sum mentamálanevndin setti um framtíðar nýtslu av húsinum. Tað er framvegis okkara ynski at fáa tætt samstarv í lag við Tórshavnar býarsavn, og hevur savnsvørðurin, Erland Viberg Joensen, verið so beinasamur at vera við á fundum í stýrinum. Her hevur m.a. spurningurin um prentsmiðjuna í Gamla Bókahandli verðið nevndur, og eru vit sinnað at verða við í eini loysn av hesum máli. Somuleiðis kann hugsast, at málið um eldsmiðju væl kann greiðast í kjallaranum undir tí endurbygda partinum móti skipasmiðjuni.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 250.000,00 av konto 64.

**Mentamálanevndin 3. november 2004:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nýggj umsókn**
Í skrivinum verður víst til fundin við borgarstjóran og umsitingina 16. mars 2005, har drotningavitjanin í summar varð umrødd. Nýggja tilfari varð lagt fram, sum stovnurin hevur gjørt, og somuleiðis varð lagt fyri umboðini fyri gamla hospital tær ætlanir, býráðið hevur lagt fyri vitjanina, ætlanir sum m.a. umfata økið uttan um Müllers pakkhús.

Kanningar eru gjørdar, hvussu farast kundi fram, soleiðis at uttandura arbeiðið á gamla hospital kundi vera komið sum longst um hálvan juni komandi. Arbeiðið kostar kr. 575.000,00 at gera og søkir stovnurin um kr. 475.000,00 sum neyðugt er fyri at ganga ynskinum frá býráðnum á møti.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 475.000,00 av konto 64.

**Mentamálanevndin 6. apríl 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Uppískoyti:**
Skriv frá Sjálvsognarstovninum Gamla Hospital, dagfest 19. november 2007, um loyvi at taka upp lán, har kommunan stendur fyri lánsgjøldum í eitt ávíst áramál, soleiðis sum vanligt er, tá ið ítróttarfeløg og áhugafeløg byggja.

Í skrivinum verður m.a. sagt:

"Royndirnar at fáa stuðul úr grunnum og fyritøkum hava einans givið smávegis úrslit. Tí verður neyðugt at útvega fígging við lántøku. Nevndin hevur tí fingið til vega tilboð fyri alt írestandi arbeiðið. Tilboðini, uttan mvg, eru hesi:

| | | |
|---|---|---|
| J.M.J. Smíð, arbeiði uttan | kr. | 4.450.000,00 |
| - arbeiði innan | kr. | 3.000.000,00 |
| Elmek, el-innlegging | kr. | 128.000,00 |
| Hiti, HVS-innlegging | kr. | 329.000,00 |
| Máling uttan og innan (mett) | kr. | 300.000,00 |
| Íalt | kr. | 8.207.000,00 |

Tilboðini vísa, at allir byggiprísir, bæði tilfar og arbeiðslønir, eru farnir heilt nógv upp hesi seinastu árini. Sjálvt um tað lægra meirvirðisgjaldið verður nýtt aftur í hesum føri, so verða eisini óvæntaðar útreiðslur, og ger hetta, at lánsupphæddin eigur at vera 10 mió. kr.

Vit leggja dent á, at húsið verður eitt livandi savn við skiftandi framsýningum og almennum tiltøkum. Nevndin er samd um, at umsitingin hjá býarsavninum er vælkomin at fáa innivist í húsinum, og hon er altíð til reiðar at tosa nærri um ogn og rakstur í framtíðini."

Í løtuni húsast býarsavnið í Arnes Minde við Kirkjuvegin, har savnið hevur eina llítla skrivstovu á loftinum á somu hædd, sum dagrøktin heldur til. Býarsavnið hevur nú møguleika at fáa innivist í Gamla Hospitali bæði fyri fastari skrivstovu og framsýningarhølum.

Gamla Hospital er í grannalag við Müllers Pakkhús, lágu- og høgukai, Westward Ho og annað søguligt umhvørvi m.a. Rættará og Skálatrøð. Hetta gevur savninum gyltan møguleika at brúka kringumstøðurnar í sínum virksemi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at Tórshavnar kommuna stendur fyri lánsgjøldum 10 mió. kr., og at peningurin verður goldin av konto 64.

Treytin fyri játtanini er, at ognin verður ogn hjá Tórshavnar Býarsavni, tá ið húsini eru liðug umvæld.

**Mentamálanevndin 16. januar 2008:** Samtykt at heimila umsitingini at samráðast við Sjálvsognarstovnin Gamla Hospital um treytir fyri stuðlinum at gera húsini liðug og gera uppskot um sáttmála at leggja fyri mentamálanevndina, fíggjarnevndina og býráðið.

**Uppískoyti:**

Skriv frá Sjálvsognarstovninum Gamla Hospital, dagfest 31. januar 2008:

"Vísandi til samtykt í mentamálanevndini tann 16. januar 2008 hevur nevndin fyri sjálvsognarstovnin á fundi í dag samtykt:

Verður umsøkti stuðulin veittur, vil sjálvsognarstovnurin átaka sær at gera tann søguliga bygningin lidnan uttan og innan, soleiðis sum verkætlanin vísir.

Samstundis vil sjálvsognarstovnurin gera sáttmála við býráðið, sum gevur Tórshavnar býarsavni rætt at nýta bygningin til sítt endamál.

Hóskandi partur av húsinum skal nýtast til tað í viðtøkum stovnins ætlaða sjúkrahússavnið.

Tá ið liðugt er bygt, fær kommunan rætt til at taka við ognini sum hon er og liggur saman við øllum, sum sjálvsognarstovnurin og feløgini aftan fyri hann hava lagt í bygningin.

Nevndin viðmerkir, at við tílíkum sáttmála, fær býráðið tað aftur, sum er latið í stuðli til hospitalið umframt tað, sum sjálvboðið er lagt í ætlanina (uml. 1,2 mió kr., meginparturin frá forngripafelagnum, og teir nógvu gripir, ið sjúkrasystrarnar hava savnað). Tá eigur kommunan eitt sjáldsamt og søguligt hús í besta standi fyri ein kostnað, sum svarar á leið til dagsins prísir fyri nýbygging, og sum kann sammetast við tann prís, ið samráðst hevur verið um fyri annað hús í sama søguliga umhvørvi."

**Mentamálanevndin 6. februar 2008:** Útsett.

**Uppískoyti:**
Fundarfrásøgn frá fundi 12. februar 2008 millum Sjálvsognarstovnin Gamla Hospital og umsitingina er sent limunum í mentamálanevndini saman við skránni.

**Mentamálanevndin 2. apríl 2008:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í skrivi frá Sjálvsognarstovninum Gamla Hospital, dagfest 25. mars 2010, verður víst til fundir, sum áður hava verið við býarumsitingina, og til umsókn um at taka lán við kommunalum veðhaldi. Sagt verður m.a.:

"Sum vit skilja, hevur broytta fíggjarliga støðan hjá kommununi gjørt tað trupult at játta umsóknina. Av tí sama hevur alt arbeiðið ligið stilt nú í drúgva tíð, og vit ásanna, at neyðugt verður at arbeiða stigvíst, skal tað eydnast at bjarga Gamla Hospitali.

Tá verður tað fyrsta stigið at tryggja tað, sum er gjørt, og vit halda tað vera rætt at gera húsini liðug uttan, herundir at reisa og inniloka suðurendan, har grund er lagað til gomlu skurðstovuna."

Sjálvsognarstovnurin Gamla Hospital hevur havt samband aftur við byggifyritøkuna, sum gav boð upp á samlaðu verkætlanina, og hevur fingið eina meting, sum vísir, at uttandura arbeiðið (tó ikki við tekju úr fløgugróti, sum upprunaliga ætlað) kann gerast fyri uml. 1,2 mió. kr., og biðið verður nú um, at kommunan veðheldur fyri hesa upphæddina.

Ásannast má, at neyðugt er at fáa húsini liðug uttan, skal stuðulin, sum kommunan hevur játtað higartil, ikki fara til einkis eins og bygningurin nú er í vanda fyri. Varðveitingarætlanin

av Gamla Hospitali stendur og fellur tí við stuðlinum frá Tórshavnar kommunu, sum hevur áhuga í ætlanini sum íløga í mentanarliga umhvørvið á staðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta kr. 1.200.000 í stuðli av kontu 5370 Stuðul til íløgur og beina málið í fíggjarnevndina at raðfesta íløguna á langtíðarløguætlanini.

**Mentamálanevndin 1. september 2010:** Meirilutin: Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen og Annfinn Brekkstein samtykti at mæla fíggjarnevndini til at raðfesta íløguna á langtíðarløguætlanini við kr. 400.000,00 um árið í 3 ár av konto 5370.

Minnilutin: Maria Hammer Olsen og Halla Samuelsen taka støðu á einum seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 9. september 2010:** Samtykt at taka upp samráðingar við Sjálvsognarstovnin Gamla Hospital um ognarviðurskiftini.

**Uppískoyti:**
Fundur hevur verið millum Tórshavnar kommunu og umboð fyri Sjálvsognarstovnin Gamla Hospital, har viðurskiftini viðvíkjandi Gamla Hospitali vórðu umrødd og ætlan býráðsins um liðugtgerð av húsinum varð løgd fram.

Í teldubrævi 20.04.2011 skrivar Halgir W. Poulsen vegna Føroya Forngripafelag m.a.:

“Eftir avtalu skal eg vátta støðuna hjá Føroya Forngripafelag til møguliga avhending av ognini Gamla Hospitali til Tórshavnar kommunu og peningaviðurskiftini millum sjálvsognarstovnin Gamla Hospital og Forngripafelagið í hesum sambandi.” (...)

“Í stuttum hevur Forngripafelagið lagt meginpartin av útreiðslunum út, og hevur Sjálvsognarstovnurin Gamla Hospital skrivað undir skuldarbræv til Forngripafelagið fyri kr. 696,507,33, og latið felagnum Skaðaloysisbræv stórt kr. 800,000 tinglýst við 1. veðhaldi í Matr. nr. 220d Tórshavn. Húsið stendur á leigaðum øki, sum er ogn Tórshavnar kommunu.” (...)

“Um so er, at Tórshavnar kommuna átekur sær at seta Gamla Hospital í stand samsvarandi fornfriðingarligum og byggisøguligum atlitum og váttar mótvegis felagnum, at hetta verður gjørt og at húsið verður varðveitt og brúkt samsvarandi ætlanunum hjá Sjálvsognarstovninum Gamla Hospitali ella til tilsvarandi endamál, vil Forngripafelagið fyri sítt viðkomandi avhenda bygningin til kommununa uttan at fáa tann útlagda peningin endurgoldnan. So skjótt felagið hevur fingið uppskot frá Býráðnum um ætlanina við ístandseting og framtíðar brúk av húsinum, heldur felagið nevndarfund og gevur Býráðnum formligt svar.”

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at boða felagnum frá, at kommunan er sinnað at seta Gamla Hospital í stand eftir upprunaligu ætlanini, og at kommunan fer at brúka húsini til savnsendamál samsvarandi ætlanum felagsins.

**Mentamálanevndin 30. august 2011:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen og Sjúrður Olsen samtykti at taka undir við tilmælinum og beinir málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Elin Lindenskov tekur ikki støðu í málinum.

Ein annar minniluti: Halla Samuelsen tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 31. august 2011:** Ein meiriluti: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Sjúrður Olsen, mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og boða Føroya Forngripafelag frá, at kommunan er sinnað at yvirtaka ognina fyri 0,- kr.

Ein minniluti: Elin Lindenskov, mælir býráðnum frá at yvirtaka ognina.

**Býráðið 8. september 2011:** Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Jákup Símun Simonsen, Vagnur Johannesen, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Halla Samuelsen, Elin Lindenskov og Rúni Djurhuus

## Ískoyti:

Eftir býráðssamtyktina 8. september 2011, at kommunan skuldi yvirtaka ognina Gamla Hospital og seta hana í stand, boðaði Sjálvsognarstovnurin Gamla Hospital frá í skrivi 10. oktober 2011, at hann tók av tilboðnum og fór at gera tilfarið til verkætlanina liðugt at handa býráðnum saman við skeytinum.

Í skrivi 5. januar 2012 segði sjálvsognarstovnurin frá, at takið á Gamla Hospitali hevði fingið skaða av illveðri, og tey ynsktu at bíða við avhendingini, til takið var umvælt. Roynt varð at útvega pening aðrastaðni til umvælingina. Í skrivi 23. juli 2012 til kommununa varð boðað frá, at sjálvsognarstovnurin framvegis ynskti at bíða við avhendingini og avtøkuni av sjálvsognarstovninum, til svar var komið frá útlendskum grunni.

Í juni í ár vendi sjálvsognarstovnurin sær aftur til kommununa við skrivi, dagfest 16. juni 2014. Boðað varð frá, at ein nýggjur møguleiki hevur tikið seg upp, og at roknað varð við stuðli frá Føroya Forngripafelag. Í skrivinum stendur m.a.: “Hetta vil verða ein stórur lætti fyri okkum, sum hava fylgt málinum og duga at síggja, at bygningurin forferst meira og meira, verður arbeiðið ikki sett í verk sum skjótast. Vit vænta, at hetta verður ein stórur lætti eisini fyri kommununa og rokna tí við, at tað er í lagi, at sjálvsognarstovnurin kann fara undir aftur arbeiðið í næstum og undir somu treytum, sum vóru undan býráðssamtyktini frá 8. sept. 2011. Vit biðja um, at kommunan váttar hetta.”

## Tilmæli:

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at ganga ynskinum hjá Sjálvsognarstovninum Gamla Hospitali á møti.

**Mentamálanevndin 26. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, sum merkir at Tórshavnar kommuna yvirtekur ikki ognirnar Gamla Hospital, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

# 249/14 Hanna Haraldsen : Umsókn vegna eigarar av matr. nr. 1180a um at fáa sparkivøll og grillpláss á økið í Svanga (2012-1222

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 64/14 | 14/03946-14 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 337/14 | 14/03946-14 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 249/14 | 14/03946-14 |

**Umsókn um sparkivøll og grillpláss á matr. nr. 1180a**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Fyri árum síðan varð uppskot gjørt til skipan av frítíðarøkinum 1180a í Svanga. Økið liggur við Grønlandsvegin, Hvalsoyar- og Torsteinsgøtur og í Svanga. Hetta økið varð lagt av til óbygt øki í útstykkingarætlanini hjá Ólavi Højgaard sála. Allir íbúgvarnir í útstykkingini eiga sín part av felagsfrítíðarøkinum 1180a. Táverandi planur varð ongantíð settur í verk tí at semja var ikki millum íbúgvarnar/eigarnar.

Nú er ynski komið frá øllum eigarunum um at kommunan yvirtekur økið og skipar sparkivølll og grillpláss, annars fær kommunan ikki ognarrætt til økið.

Vanlig siðvenja hevur verið í nógv ár at kommunan ikki yvirtekur ognarrættindini til tílík frítíðarøki, men at kommunan / lendisdeidlin í samráð við eigarnar ella umboð teirra gera uppskot og við tí søkja kommununa um stuðul at fremja ætlanina. Víst verður til málið um spæliøki og bóltvøll í Dalakróki har kommunan tók undir við at veita stuðul kr. 300.000, sama er gjørt í Maritugøtu og øðrum útstykkingum.
Fíggingaruppskot :
Fígging er ikki tøk til málið í 2012, neyðugt er tí við eini umraðfesting um ætlanin skal gjøgnumførast.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og.býargartnarin mæla nevndini til at viðgera málið við møguligari umraðfesting av konto 6275 á fíggjarætlanini 2012 sambært lýsing og uppskoti omanfyri.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Einmælt samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at játta kr. 300.000 av konto 6275 við at umraðfesta arbeiðini soleiðis, at smáttan við Sandá í Havnadali verður útsett.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanar-reglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin 'Sparkivøllur í Svanga', L62018, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest avlop álj. kr. 1.000,-.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið til kunningar.

Heðin Mortensen og Jógvan Arge luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

# 250/14 Leigusáttmálar sjálvsognarstovnar á dagstovnaøkinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 10.09.2014 | 249/14 | 14/04311-1 |
| 2 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 250/14 | 14/04311-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 10.12.2014 | 345/14 | 14/04311-1 |

**Málslýsing:**
Uppskot til sáttmálar verður lagt fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 10. september 2014:** Samtykt at taka undir við fyriliggjandi uppskotum til sáttmálar og at leggja málið fyri býráðið.

**Fíggjarnevnd 10. december 2014:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Tikið av skrá.

# 251/14 Umhvørvisflokking av virkjum - endurskoðan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.10.2014 | 8/14 | 14/04489-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 05.11.2014 | 14/14 | 14/04489-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 81/14 | 14/04489-1 |
| 4 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 251/14 | 14/04489-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Tað er týndningarmikið, at bústaðarøkir ikki hava ampa av virkjum og vinnuligum virksemi. Í 2009 bleiv veðleiðing gjørd fyri umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu. Henda vegleiðing ásetir frástøðu, ið verður mett at vera neyðug millum virkir og bústaðarøkir. Hetta fyri at minka um ampa av óljóði, dálking v.m. Vegleiðing fyri flokking av virkjum í Tórshavnar kommunu bleiv góðkend av býráðnum 19. februar 2009 (mál nr. 2007-1253).

Vegleiðingin fyri umhvørvisflokking av virkjum og frástøðu til bústaðarøkir verður nýtt í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu í samband við staðseting av virkjum teim ymsu (ídnaðar)økjunum í kommununi.

Vegleiðingin fyri umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu er endurskoða, soleiðis at hvør umhvørvisflokkur nú byggir á minstu fjarstøðu til bústaðir og ikki eitt interval fyri frástøðu, ið áður varð brúkt. Hetta ger mannagongdina fyri staðseting av virkjum í kommununi lættari at umsita. Somuleiðis gevur vegleiðingin eitt yvirlit yvir umhvørvisflokkar fyri virkir og hvøjir økir hesir virkir kunnu staðsetast í Tórshavnar kommunu.

Valt er at nýta somu fjarstøðu í nýggju vegleiðingini, sum vegleiðingin fyri staðseting av virkjum í Danmark nýtir. Fjarstøðan í vegleiðingini bygiir á royndir innan umhvørvisdárin frá tí einstaka virkislagnum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
2007-1253 Flokking av virkjum í Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin, Tórshavnar kommuna - seinast broytt 31. oktober 2013.

**Skjøl:**
Skjøl, sum eru viðkomandi í sambandi við viðgerðina av málinum:
1. Umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu - vegleiðing, sí j.nr. 14/04489-2.0
2. Håndbog om Miljø og Planlægning - boliger og erhverv i byerne, Miljøstyrelsen, Skov- og Naturstyrelsen, Danmark, 2004.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at tikið verður undir við hjáløgdu vegleiðing.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 8. oktober 2014:** Málið varð umrøtt og verður lagt fyri aftur á komandi fundi.

**Ískoyti:**

Í framhaldi av umrøðu av málinum frá 8. oktober 2014, har serliga viðmerkingar vóru til staðseting av besinstøðum í bygdum øki. Í vegleiðing fyri umhvørvisflokking av virkjum verða bensinstøðir flokkaðar í umhvørvisflokki 3. Hetta merkir, at minsta frástøða til bústaðir skal vera 50 metrar.

Serliga evnið benzen, sum er eitt ‘antiknocking’ evni í bensini, hevur stóran ávirkan á umhvørvið. Benzen er eitt luftfimt evni og er somuleiðs krabbameinselvandi. Hetta merkir, at menniskju, ið javnan eru útsett fyri útláti av benzen, eru í størri váða fyri at fáa krabbamein.

Gransking frá 2010 útgivið í tíðarritinum *Journal of Environmental Management* um bensinstøðir og ávirkan teirra á nærumhvørvið staðfestir, at evnir sum benzen kunnu ávísast upp til 100 metrar frá bensinstøðum. Miðal frástøðan, har dálking bleiv máld frá fleiri bensinstøðum, var tó 50 metrar. Dálkingin frá bensinstøðum er tengd at, hvussu nógvar pumpur besinstøðin hevur, títtleika av ferðslu til og frá bensinstøðini og veðurlagi.

Granskararnir aftanfyri greinina ráða til, at frástøðan til eina bensinstøð er 50 metrar, tá talan er bústaðir, og at henda frástøða verður økt til 100 metrar, tá talan er um viðkvæmar recpientar so sum vøggustovur og barnagarðar, skúlar, sjúkrahús, eldrabústaðir, frílendisøkir, grøn økir v.m.

Í vegleiðing fyri umhvørvisflokking av virkjum og staðseting av hesum stendur, at atlit skulu altíð vera tikin fyri tílíkum viðkvæmum recipientum, tó er metratal ikki ásett í hesum føri fyri frástøðu til bensinstøðir og onnur virkir.

Kelda: Isabel M. Morales Terrés, Marta Doval Miñarro, Enrique González Ferradas, Antonia Baeza Caracena, Jonathan Barberá Rico. **Assessing the impact of petrol stations on their immediate surroundings. Journal of Environmental Management**, 2010; 91 (12): 2754.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 5. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til fundin 8. oktober 2014 og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við náttúru- og umhvørvisnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

# 252/14 P/F EikBanki. Umsókn um at stríka servitutt á matr. nr. 620k, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 22.10.2014 | 269/14 | 14/04731-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 83/14 | 14/04731-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 334/14 | 14/04731-2 |
| 4 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 252/14 | 14/04731-2 |

**Málslýsing:**
P/F frá 13. februar 1997 (Skráset. nr. 2609) Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn, sum er dótturfelag hjá Eik Banki P/F, eigur ognina matr. nr. 620k, Tórshavn, Yviri við Strond, 100 Tórshavn.

Eik Banki P/F (Skráset. nr. 5534), Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn, eigur allan partapeningin í P/F frá 13. februar 1997.

Sambært skeyti, undirskrivað 26. september 2014, millum P/F frá 13. februar 1997, sum seljara, og P/F Eik Banka, sum keypara, avhendir P/F frá 13. februar 1997 ognina, matr. nr. 620k, Tórshavn, til P/F Eik Banka.

Sambært skjali 01.07.1947, hevur kommunan tinglýstan forkeypsrætt til bygningin.

Eik Banki P/F søkir um at kommunan:

1. góðtekur víðarisølu av ognini.
2. avlýsir servituttin um at kommunan hevur forkeypsrætt í ognini.

**Niðurstøða**
Løgdeildin metir at servitturin hevur ongan týdning, tí bygningur er bygdur á matrikulin.

**Tilmæli:**
Fyri at avgreiða málið á skjótasta hátt, mæla leiðarin av løgdeildini og kommunustjórin til:
At góðtaka víðarisølu av ognini soleiðis at skeytið kann avgreiðast beinanvegin.
At beina málið um servituttin til byggi og býarskipanarnevndina.

**Málslýsing:**
P/F frá 13. februar 1997 (Skráset. nr. 2609) Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn, sum er dótturfelag hjá Eik Banki P/F, eigur ognina matr. nr. 620k, Tórshavn, Yviri við Strond, 100 Tórshavn.

Eik Banki P/F (Skráset. nr. 5534), Yviri við Strond 2, 100 Tórshavn, eigur allan partapeningin í P/F frá 13. februar 1997.

Sambært skeyti, undirskrivað 26. september 2014, millum P/F frá 13. februar 1997, sum seljara, og P/F Eik Banka, sum keypara, avhendir P/F frá 13. februar 1997 ognina, matr. nr. 620k, Tórshavn, til P/F Eik Banka.

Sambært skjali 01.07.1947, hevur kommunan tinglýstan forkeypsrætt til bygningin.

Eik Banki P/F søkir um at kommunan:

3. góðtekur víðarisølu av ognini.
4. avlýsir servituttin um at kommunan hevur forkeypsrætt í ognini.

**Niðurstøða**
Løgdeildin metir at servitturin hevur ongan týdning, tí bygningur er bygdur á matrikulin.

**Tilmæli:**
Fyri at avgreiða málið á skjótasta hátt, mæla leiðarin av løgdeildini og kommunustjórin til:
At góðtaka víðarisølu av ognini soleiðis at skeytið kann avgreiðast beinanvegin.
At beina málið um servituttin til byggi og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og loyva víðarisølu av ognini og at beina málið um servituttin í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at mæla býráðnum til at strika servituttin á matr. nr. 620k.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og loyva víðarisølu av ognini og at strika serivuttin á ognini.

Heðin Mortensen og Jógvan Arge luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

# 253/14 Miðbýarætlan - Uppihaldstrappa í Vágsbotni

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 59/14 | 14/05063-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 330/14 | 14/05063-1 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 253/14 | 14/05063-1 |

## Málslýsing:

Í sambandi við hugskots- og prosjektkappingina, sum var liðug 16. mai 2014 (journal nr. 14/01637), var ætlanin at koma í gongd við at gera fyribils kostnaðarmetingar og raðfesta tey ymisku átøkini í miðbýnum til langtíðar íløguætlanina hjá býráðnum (journal nr. 14/01463).

Kappingin var býtt sundur í tvær uppgávur, eina heildarætlan fyri allan miðbýin og eina prosjektkapping fyri økið kring Steinatún.

Í sambandi við kappingina hava Zeta arkitektar, sum fingu 1. virðisløn í kappingini, gjørt eina fyribils kostnaðarmeting av eini uppihaldstrappu í Vágsbotni. Kostnaðarmetingin fevnir um eitt øki uppá 310 $m^2$ millum Mylnugøtu og Bryggjubakka.

Kostnaðarmetingin er gjørd út frá einum skitsuuppskoti, ið fevnir um eina uppihaldstrappu í ljóst-litaðum betongi, ið bindur økið framman fyri Bojsensgarð og torgið í Vágsbotni saman. Trappan verður skipað við smærri uppihaldsøkjum úr timbri umframt trøum og plantum. Talan er somuleiðis um ein lítlan pop-up pall við segldúki, ið kann setast upp í sambandi við tiltøk, nýggj ljósarmatur, nýggjan belegning framman fyri Bojsensgarð og eina lækkan av grótlaðaða garðinum. Økið framman fyri Havnar kirkju, ið fevnir um 250 $m^2$, kann møguliga eisini gerast ein partur av uppskotinum (verður roknað sum tilval).

Kostnaðarmetingin ljóðar uppá kr. 1.911.609. Og við eini óvissu uppá 20% gevur tað kr. 2.300.000 mió.

Býarskipanardeildin mælir nevndini til at taka støðu til, um peningur skal játtast til prosjektering av verkætlanini, soleiðis at ein meira nágreinilig kostnaðarmeting kann gerast fyri verkætlanina.

Í upprunaligu íløguætlanini fyri 2014 stóðu kr. 9 mió. til miðbýarætlan og kr. 2 mió. til spælipláss í miðbýnum. Eftir endurskoðan av íløguætlanini og flytingar til onnur endamál eru í dag kr. 3,109 mió. til miðbýarætlan og kr. 850.00 til spælipláss í miðbýnum. Í uppskotinum til íløguætlan fyri 2015 eru kr. 5 mió. settar av til miðbýarætlan.

## Tilmæli:

Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur støðu til um arbeiðast skal víðari við ætlanini.

Um arbeiðast skal víðari við ætlanini, mælir tekniski stjórin til:
- at játtaðar verða kr. 110.300 av íløgunum til miðbýarætlanina, til prosjektering og útbjóðing
- at projekt verður gjørt og arbeiðið boðið út í innbodna lisitatión
- at málið verður lagt fyri nevndina aftur, tá tilboðini eru komin inn.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum eftir leistinum omanfyri og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

# 254/14 Broyting av serstøku byggisamtykt og skeyti fyri øki við Karlamagnusarbreyt

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 67/14 | 14/05166-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 341/14 | 14/05166-1 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 254/14 | 14/05166-1 |

**Málslýsing**:
Leiðslan fyri Tórshavnar kommunu hevur ásannað, at útstykkingin við Karlamagnusarbreyt til miðstaða- og bústaðaendamál, ikki hevur livað upp til ætlanirnar og vónirnar við økinum. Tí er uppskot gjørt til nakrar broytingar av byggisamtyktini og skeytunum. Tað er longu samtykt at taka ovasta partin av Karlamagnusarbreyt, millum Rólantsgøtu og Olivantsgøtu, burtur úr serstøku byggisamtyktini fyri Karlamagnusarbreyt, fyri at stykkja hetta út til dupulthús (j. nr. 14/04565). Eisini hevur býráðið samtykt, at leggja ein fótbóltsvøll við skúlan við Løgmannabreyt (j. nr. 14/04430), sum við tíðini eisini fer at ávirka byggingina við Karlamagnusarbreyt.

Mett verður, at tað ikki er ynski um ella brúk fyri so nógvum øki til lættari vinnu og útvenda nýtslu, sum er kravt av allari bygging við Karlamagnusarbreyt. Tí er ætlanin, at broyta §2, stk. 4 og §4, stk. 6 í serstøku byggisamtyktini.

> §2, Stk. 4. Partur av veghædd skal verða til útatvenda nýtslu (handil, matstovu o.t.), ið almenningurin hevur atgongd til.

Verður broytt til

> §2, Stk. 4. Partur av veghædd skal *á byggifeltunum millum Hoyvíkar kirkju og Atlagøtu*, verða til útvenda nýtslu (handil, matstovu o.t.), ið almenningurin hevur atgongd til.

Og

> §4, Stk. 6. Ein partur av veghædd skal verða til útatvenda nýtslu (handil, matstovur o.t.). Hesin parturin er endin í niðastu hædd ímóti Karlamagnusarbreyt og 6 m inn í bygningin. Sí viðhefta kortskjal nr. 4.1, ið vísir prinsippskurð.

Verður broytt til

> §4, Stk. 6. Ein partur av veghædd *á byggifeltunum millum Hoyvíkar kirkju og Atlagøtu* skal verða til útvenda nýtslu (handil, matstovur o.t.). Hesin parturin er endin í niðastu hædd ímóti Karlamagnusarbreyt og 6 m inn í bygningin. Sí viðhefta kortskjal nr. 4.1, ið vísir prinsippskurð.

Í skeytinum fyri grundøkini við Karlamagnusarbreyt stendur í grein 3, stk. i,

> Stykkið kann sundurbýtast, vísandi til løgtingslóg nr. 11 frá 3.apríl 1970 um eigaraíbúðir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 25 mai 2009, tó við tí

avmarking at veghædd og møguligur kjallari, kunnu ikki býtast sundur og skulu vera ein samlað eind.

Hetta er ætlanin at broyta til

Stykkið kann sundurbýtast, vísandi til løgtingslóg nr. 11 frá 3. apríl 1970 um eigaraíbúðir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 55 frá 25. mai 2009.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til at broyta serstøku byggisamtyktina fyri Karlamagnusarbreyt og skeyti fyri grundstykkir við Karlamagnusarbreyt sambært omanfyri standandi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen og Jógvan Arge luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundir**<br>11. desember 2014 | Blað nr.: 11998<br><br>Formansins merki: |

# 255/14 Eldrapolitikkur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 01.12.2014 | 55/14 | 14/05233-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 344/14 | 14/05233-1 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 255/14 | 14/05233-1 |

## Málslýsing:

Í sambandi við yvirtøkuna av eldraøkinum, hevur politiska fylgitoymið orðað uppskot til visjón og politiskar málsetningar fyri økið undir heitinum "Virkin og vakin – alt lívið" (s. 18-19 í arbeiðsriti við sama heiti). Hetta er eldrapolitiska grundarlagið ikki bert fyri Heilsu- og umsorganartænastuna, men eldrapolitikk kommununnar sum heild.

Mett verður tí skilagott, at eldrapolitikurin er formliga samtyktur í býráðnum áðrenn 1. januar 2015, tá økið er kommunalt.

Sambært heimildarskipanini er tað býráðið, sum samtykkir politikkir eftir tilmæli frá faknevnd og fíggjarnevnd.

## Tilmæli:

Trivnaðarstjórin og leiðarin mæla til at samtykkja uppskotið til eldrapolitikk.

**Trivnaðarnevndin 1. desember 2014:** Samtykt hesa orðing til eldrapolitikk og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Virkin og vakin – alt lívið**

Í Tórshavnar kommunu skal vera gott hjá øllum at liva og virka í tryggleika og nærleika.

1) *Borgarar, sum eru komnir upp í árini, eru eitt tilfeingi, sum við tilboðum og átøkum verður røkt við somu virðing sum aðrir aldursbólkar.*

**Mál:** 1) Kannað verður eftir, hvørjum borgararnir hava brúk fyri. 2) Fyrilit verður havt fyri førleikum. 3) Stuðlað verður undir veikleikar. 4) Dentur verður lagdur á at brúka kunnleika og førleikar hjá tí roynda borgaranum. 5) Vera sum longst á arbeiðsmarknaðinum. 6) Fyrireiking at fara úr arbeiði.

2) *Heilsurøkt og umsorgan er eitt týdningarmikið málsøki hjá Tórshavnar kommunu, sum vil ganga á odda og veita skjóta og góða heildartænastu.*

**Mál:**1) Einfalt at koma í samband við Heilsu- og umsorganartænastuna. 2) Borgarin fær skjótt og greitt svar um møguleikarnar fyri tænastu/veiting. 3) Tryggjaður verður hægsti fakkunnleiki.

3) *Innihaldið í tænastunum verður ment og tænastan meira fjølbroytt til tess at møta tørvinum og ynskjunum hjá einstaka borgaranum. Í býarætlanini tryggjar kommunan fjølbroyttar bústaðarmøguleikar, sum eru lagaðir eftir tørvinum.*

**Mál:** 1) Fjølbroytt tænasta er alneyðug. 2) Tilboðini hava fyrilit fyri tí einstaka. 3) Hava fólk umstøður til tað, verða tey heima sum longst. 4) Útvegaðir verða eisini bústaðarmøguleikar, sum eru lagaðir til umstøðurnar. 5) Vælferðartøkni og nýhugsan annars er partur av tænastumenningini. 6) Á búeindunum minnir dagliga mentanin sum mest um at búgva og liva heima í einum umhvørvi, sum er skipað úr teimum møguleikum, sum búfólk, avvarandi og starvsfólk í felag síggja og leggja til rættis.

*4) Dentur verður lagdur á heilsustimbran og fyribyrging, eins og at allir borgarar kunnu kenna seg sum part av felagsskapinum.*

**Mál:** 1) Rørsla. 2) Kostur. 3) Virksemi. 4) ítriv. 5) Handverk. 6) Handarbeiði. 7) Møguleikar fyri, at borgarar í øllum aldri koma hvør øðrum við.

*5) Kommunan eigur at vera uppsøkjandi. Borgarin skal hava í boði fjølbroyttar virkis-møguleikar bæði til likams og sálar, og tann lívsfúsi borgarin skal eggjast til sjálvboðið at taka lut í átøkum til frama fyri onnur*

**Mál:** 1) Kommunan er úti um seg til tess at hava gott innlit í tørvin hjá fólki. 2) Virksemi sum Heilræði og Tilhald verður ment. 3) Eggjað verður fólki til at taka á seg m.a. vitjanartænastu. 4) Pensjónistar verða eggjaðir til at hjálpa javnlíkum at vera virknir.

*6) Heilsurøkt og umsorgan skal skipast so áhugavert, at tað dregur tey bestu starvs-fólkini til sín. Dentur verður lagdur á hægsta fakkunnleika bæði í leiðslu, tilboðum og røkt. Umsitingin verður dygg og bygnaðurin samansjóðaður.*

**Mál:** 1) Hildið verður fram at menna førleikarnar hjá starvsfólki og leiðslu at veita tilboð og røkt. 2) Heilsu- og umsorganartænastan verður ment sum útbúgvingarstað fyri lesandi og næmingum í starvsvenjing. 3) Skipað verður fyri granskingarverkætlanum og øðrum mennandi verkætlanum.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt við niðanfyri standandi ískoyti til seinasta punkt: Leiðslan hevur ábyrgd at skapa eina samanhangandi dygdarmentan, har øll hava samábyrgd fyri dygdarstøðinum í bygnaðiinum, tilfeinginum og tænastunum, og áhaldandi eru hyggin um at betra dygdarstøðið.

# 256/14 Átak um oljutangar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
| --- | --- | --- | --- |
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.09.2014 | 4/14 | 14/04110-1 |
| 2 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 26.11.2014 | 24/14 | 14/04110-1 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 256/14 | 14/04110-1 |

**Málslýsing:**
Umsitingin fær javnan fráboðan um oljudálkingar á landi og ofta verður staðfest, at dálkingin stavar frá leka av gomlum oljutangum.
Húsaeigarar gera tá ofta vart við nógvan oljulukt inni í sethúsunum, og ikki er vist, hvar oljulukturin stavar frá.

Sum dømi kann vísast á niðanfyri standandi mál:

j.nr. 2008-0886:
Tórshavnar kommuna fekk í 2008 fráboðan um nógvan oljulukt í einum sethúsum í Klokkaragøtu í Havn.
Tað vísti seg tó, at oljuluktur var í fleiri sethúsum á økinum, t.e. á Lítlutrøð, Klokkaragøtu og á Langatúni.
Staðfest vað, at oljulekin stavaði frá einum gomlum sethúsaoljutanga á Djóna í Geil gøtu, ið hevði fingið 300 litrar av olju tann 13. mars 2008 og 19. mars var eingin olja eftir í tanganum.
Oljan var farin niður í lendið og sivað niður í kloakkina á Lítlutrøð.
Oljutangin og oljudálkaða lendið varð grivið upp, og harafturat varð kloakkin á Lítlutrøð og á Klokkaragøtu skolað út fyri at basa luktampanum. Hetta hjálpti uppá oljulukt í húsunum.

j.nr. 2010-0473:
Í Tróndargøtu í Havn bleiv í 2010 fráboðað, at nógvur luktur av olju var í kjallaranum í einum sethúsum. Tað var ikki búgvandi í kjallaraíbúðini og fólkini máttu tí flyta út.
Funnið varð fram til, at tað var returin á oljutanganum á ognini sjálvari, ið lak og var oljan sivað niður í lendið og inn undir húsagrundina.

Mett verður, at eitt átak um gamlar oljutangar hevði sett fokus á trupulleikar við oljudálking. Møguliga kundi eitt átak um oljutangar eisini elvt til fyribyrging av nógvum dálkingum, við at fólk tá høvdu verið gjørd varug við dálkingarampar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Eingin áseting. Upplýsast kann, at kunngerð um sethúsaoljutangar var til hoyringar í 2006 j.nr. 2006-2251, men varð hendan kunngerðin ongantíð lýst.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at umsitingin ger uppskot til hvussu eitt møguligt átak kann skipast, at leggja fyri nevndina aftur.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 1. september 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Ætlanin við átakinum hevur verið, at arbeiða fyri at fáa gjørt eina felags pulju, har oljufeløgini, tryggingarfeløg og møguliga onnur kunnu seta pening í puljuna, á sama hátt sum gjørt verður t.d. í Danmark. Puljan kann so veita stuðul til sethúsaeigarar, ið hava gamlar oljutangar.

Løgdeildin metir, at landsmyndugleikarnir eiga at verða við í arbeiðinum at skipa átakið um oljutangar.

Málið verður tí tikið upp við Umhvørvisstovuna, har tað umframt hetta, eisini verður heitt á landsmyndugleikarnar, um at fáa kunngerðina um sethúsaoljutangar lýsta.

Ætlanin er harafturat, at gera ein faldara um sethúsaoljutangar, at senda út í hvørt húski.

Uppskot til innihald í faldaranum kundi t.d.verið:

- Skal oljutangin skiftast?
- Hvat geri eg við oljuleka/dálking?
- Avriggan av oljutanga íroknað livitíð
- Einstreingja rørføring.
- Trygging við oljuleka –upplýsing?

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at umsitingin ger uppskot til faldara, at leggja fyri nevndina aftur, at arbeitt verður víðari við at fáa landsmyndugleikarnar at seta kunngerðina í gildi og annars at arbeiða víðari við átakinum um stuðul.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 26. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at biðja býráðið um at heita á Kommunufelagið um at fáa landsmyndugleikan at fáa kunngerðina um sethúsaoljutangar lýsta.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

# 257/14 Spillivatnsætlan fyri Tórshavnar kommunu fyri 2011-2015 (2010-2190)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 26.11.2014 | 276/14 | 14/01361-62 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 320/14 | 14/01361-62 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 257/14 | 14/01361-62 |

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Umsitingin hevur latið gera spillivatnsætlan fyri Tórshavnar kommunu sambært krøvum í kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009 um spillivatn. Ætlanin umfatar:

- Lýsing av spillivatnsskipanini, íroknað bygnað, tilfar, aldur, reinsing og kloakkeringsøkið
- Slag og nøgd av spillivatni, ið verður og fer at verða leitt gjøgnum leiðingarnar
- Útleiðingarstøð og umhvørvi rundanum, t.d. botn- og vatngóðsku og streymviðurskifti
- Ampar og umhvørvisárin frá skipanini og útleiðingini
- Eftirlit og røkt av spillivatnsskipanini
- Meting um væntaða menning í kommununi hvat fólkatali og ídnaðartilgongd viðvíkur, og hvønn týdning menningin hevur fyri samansetingina og nøgdina av spillivatni, og fyri umhvørvið, ið spillivatnið verður leitt út í
- Grundgivna raðfesting av nær ætlaða kloakkeringsarbeiðið verður framt, og nær tað væntandi verður liðugt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin fyri heilsu- og umhvørvisdeildina mæla til, at spillivatnsætlanin verður samtykt, herundir at avseta neyðuga fígging, soleiðis at tíðarfreistin sambært lógarkrøvunum verður hildin.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 27. september 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Sambært framlagdari spillivatnsætlan (j. nr 2010-2190/25) er neyðugt at íløgujáttanin næstu árini er:

- 2012: 7,5 mió.
- 2013: 7,5 mió.
- 2014: 4,1 mió.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at býráðið játtar 7,5mió kr. av íløgukarmunum í 2012, 7,5mió kr. av íløgukarmunum í 2013 og 4,1mió kr. av íløgukarmunum í 2014 – ella samanlagt 19,1 mió.

**Tekniska nevnd 18. oktober 2011:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Víst verður til fíggjarætlanina fyri 2012, har 5 mió. kr. eru settar av til spillvatnsætlanina. Málið um restfígging verður tikið upp í sambandi við viðgerðina av fíggjarætlanini fyri 2013 og 2014.

**Býráðið 20. oktober 2011:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Spillivatnsætlanin, sum varð samtykt í býráðnum 20. oktober 2011, varð send Umhvørvisstovuni til góðkenningar.

Kommunan fekk tá nakrar viðmerkingar, og ætlanin varð ikki góðkend av tí at nøkur viðurskifti ikki vóru nevnd í ætlanini. Viðmerkingar vóru m.a. til manglandi umsókn um undantaksloyvi fyri Syðradal og Norðadal viðvíkjandi kravinum um at útleiðingar skulu liggja 1 m undir størstu fjøru.
Tær viðmerkingar, sum kommunan fekk tá, eru viðgjørdar og ætlanin send Umhvørvisstovuni (US) av nýggjum. Spillivatnsætlanin varð góðkend av (US) 21. juni 2012, men verður hetta ikki lýst á heimasíðuni, fyrr enn ætlanin er góðkend av býráðnum.
Smærri broytingar eru í nýggju útgávuni av spillivatnsætlanini, og verður hon tí løgd fyri viðkomandi nevndir og býráð aftur.

Kostnaðarmetingin fyri tað arbeiðið sum skal gerast, sum er partur av spillivatnsætlanini í verandi líki, er tann sama sum í fyrru útgávuni.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tá spillivatnsætlanin varð skrivað í 2011, varð komið fram til eina kostnaðarmeting áljóðandi 19,5 mió. kr. fyri at fáa bygnaðin á spillivatnsskipanini góðkendan innan 2015, soleiðis sum ásett við lóg. Í langtíðarfíggjarætlan kommununar var skotið upp at fíggja írestandi íløgurnar soleiðis: 2012: 7 mió., 2013: 8 mió. og 2014: 5 mió. Játtanin fyri 2012 er samtykt.

Stórur partur av spillivatnsskipanini er ikki lýst nóg væl í FDS-skipanini og tískil mangla upplýsingar um stórar partar av skipanini. Tað krevur eitt umfatandi og drúgt skrásetingararbeiði og innlegging av talgildum data í skipanina, fyri at fáa hesar upplýsingar til vega. Hetta merkir sostatt, at tað eru nógvir trupulleikar og manglar í skipanini, sum ikki eru kendir í dag. Kanningar eru farnar í gongd fyri at kannað góðskuna á øllum leiðingum í kommununi. Hesar kanningar koma væntandi at taka langa tíð og væntast kann, at kostnaðurin av hesum ábøtum verður stórur. Tískil skal eisini roknast við, at dagføring av gomlum kloakkleiðingum o.l. er eitt arbeiði sum farast skal undir, tá arbeiðið at løggilda útleiðingar v.m. er komið á mál við ársenda 2014. Fígging til kloakkir má tí halda áfram í nøkur ár afturat, eftir 2015.

Listin yvir hesar trupulleikar eigur sum áður nevnt at verða tengdur at spillivatnsætlanini, tá hon skal endurskoðast, og kemur hetta at føra størri kostnaðir við sær. Spillivatnsætlanin skal dagførast 3. hvørt ár og so hvørt, munandi broytingar ella ískoyti verða gjørd til ætlanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á heilsu- og umhvørvisdeildini mæla til at góðkenna spillivatnsætlanina og at beina málið í teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 4. september 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2012:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Ískoyti:**

Spillivatnsætlanin var viðgjørd á evnisdegi (j.nr. 14/04826) í Norðradali hin 22. oktober 2014, og er ætlanin, at tekniska nevnd skal umrøða innsatsøkini í spillivatnsætlanini.

**Tekniska nevnd 26. november 2014:** Umsitingin kunnaði um spillivatnsætlanina. Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Helena Dam á Neystabø og Marin Katrina Frýdal, staðfesti neyðuga fíggjartørvurin áljóðandi umleið 70 mió kr. og samtykti at heita á býráðið um fíggjarnevndina um at seta í minsta lagi eina árliga upphædd á 10 mió kr. til spillivatnsætlanina.

Ein minniluti, Bogi Andreasen, tekur undir við spillivatnsætlanini.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at taka undir við, at peningur verður avsettur til spillvatnsætlanina komandi árini.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

## 258/14 Miðbýarætlan - Steinatún

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 61/14 | 14/05065-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 331/14 | 14/05065-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | | | 14/05065-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 14/05065-1 |
| 5 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 258/14 | 14/05065-1 |

### Málslýsing:

Í sambandi við hugskots- og prosjektkappingina, sum var liðug 16. mai 2014 (journal nr. 14/01637), var ætlanin at koma í gongd við at gera fyribils kostnaðarmetingar og raðfesta tey ymisku átøkini í miðbýnum til langtíðar íløguætlanina hjá býráðnum (journal nr. 14/01463).

Kappingin var býtt sundur í tvær uppgávur, eina heildarætlan fyri allan miðbýin og eina prosjektkapping fyri økið kring Steinatún.

Zeta arkitektar, sum fingu fyrstu virðisløn í kappingini hava gjørt eina fyribils kostnaðarmeting fyri 1. byggistig av prosjektinum við Steinatún. 1. byggistig fevnir um betraði ferðsluviðurskifti, nýggjan flísa- og steinbelegning, uppfylling av steinagøtu oman ímóti Bank Nordik bygninginum, nýggja uppihaldstrappu við Tilhaldið, ljós og planting.

Kostnaðarmetingin er gjørd út frá einum skitsuuppskoti, sum ikki er gjøgnumarbeitt, og er tí rættiliga óviss. Hædd er heldur ikki tikin fyri møguligum trupulleikum við undirlendinum, og at arbeiðið skal ganga fyri seg á einum vegastrekki við nógvari ferðslu.

Kostnaðarmetingin ljóðar uppá kr. 14,4 mió. Og við eini óvissu uppá 20% gevur tað kr. 17,4 mió.

Í sambandi við ætlanina, hevur umsitingin biði Rambøll um tilboð uppá eina ferðslukanning við simulering av broyttu umstøðunum við Steinatún. Rambøll kann gerða hetta fyri kr. 60.000,-.

Býarskipanardeildin mælir nevndini til at taka støðu til, um peningur skal játtast til prosjektering av verkætlanini, soleiðis at ein meira nágreinilig kostnaðarmeting kann gerast fyri verkætlanina.

Í upprunaligu íløguætlanini fyri 2014 stóðu kr. 9 mió. til miðbýarætlan og kr. 2 mió. til spælipláss í miðbýnum. Eftir endurskoðan av íløguætlanini og flytingar til onnur endamál eru í dag kr. 3,109 mió. til miðbýarætlan og kr. 850.000 til spælipláss í miðbýnum. Í uppskotinum til íløguætlan fyri 2015 eru kr. 5 mió. settar av til miðbýarætlan.

### Tilmæli:

Tekniski stjórin mælir til, at nevndin tekur støðu til um arbeiðast skal víðari við ætlanini, sum er mett at kosta íalt 15-20 mió.

Um arbeiðast skal víðari við ætlanini, eigur projekteringin at verða sett í gongd, umframt kanningar av leiðingum, ferðslukanning v.m.

Projekteringin er mett til kr. 1.300.000

Ferðslukanning er mett til kr. 60.000

Verður peningur játtaður, eigur tað at fara av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at gera eina ferðslukanning og at heita á fíggjarnevndina um at játta kr. 60.000 av íløgum til miðbýarætlanina. Eisini samtykti nevndin, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti**:
Í sambandi við arbeiði við miðbýarætlanini, eru ymiskar kanningar gjørdar, umframt at ein meirnýtsla hevur verið í sambandi við arkitektakappingina, hetta er gjørt upp til íalt kr. 510.022,- harav kr. 181.418,75 er meirnýtsla og kr. 328.603,25 til ymiskar kanningar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at játtaðar verða kr. 60.000,- til ferðslukanning við Steinatún, umframt kr. 510.022,00 til at gjalda omanfyri nevndu rokningar, soleiðis at tað íalt verða játtaðar kr. 570.022,00 av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at játta kr. 60.000 til ferðslukanning við Steinatún, ið verður at játta av íløgunum til miðbýarætlanina.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

# 259/14 Útstykking á Kongavarða til raðhús matr. nr. 255a, Argir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 72/14 | 14/05160-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.12.2014 | 333/14 | 14/05160-2 |
| 3 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 259/14 | 14/05160-2 |
| 4 Fíggjarnevnd | 10.12.2014 | 346/14 | 14/05160-2 |

**Málslýsing**:
Tórshavnar kommuna hevur keypt matr. nr. 255a, Argir, og er ætlanin at halda áfram við útstykkingini hjá Valbjørn Dalsgarð.

Eftir hesi ætlan skuldu raðhús byggjast fremst í útstykkingini. Umleið helvtin av hesum raðhúsum eru bygd og restina av økinum gjørt byggiklárt, soleiðis at klárt er at fara í gongd við at byggja.

Í uppruna ætlanini er pláss fyri 30 raðhúsum afturat, men tá er tætt bygt.

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin mælir til:
- at eitt passandi øki verður frábýtt, at bjóða út til áhugaðar keyparar, við treyt um at byggjast skulu raðhús eftir einari ætlan, sum kommunan ger.
- at kommunan treytar sær, at byggingin í sambandi við góðsku og útsjónd er á minst sama støði sum verandi raðhúsabygging.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Samtykt at frábýta økið, sum er ætlað til bygging av raðhúsum, og at bjóða økið út til áhugaðar keyparar at byggja raðhús á og at kommunan við søluni tryggjar sær, at byggingin í útsjónd verður á sama støði sum verandi raðhúsabygging.

**Fíggjarnevnd 03. december 2014:** Samtykt at gera útbjóðingartilfar, ið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina, áðrenn økið verður boðið út til áhugaðar keyparar.

Heðin Mortensen og Jógvan Arge luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Niðanfyri er lýsing av útstykkingini ”raðhúsabygging undir Kongavarða” sum liggur á økinum millum verandi raðhús og arbeiðshøllina við innkoyringina til Kongavarða.

Talan er um raðhús í 5 eindum við 5-7 húsum i hvørjari eind, íalt 30 eindir.

Samlaða økið, matr. nr. 255a, Argir er 19.504m2 + 65.601m2, ella tilsamans uml. 7½ ha.

Politiskt er ynski um at bjóða alt út í senn og skjótast gjørligt.

**1. Byggibúningararbeiði**
Kommunan hevur ikki dagførdar tekningar yvir økið og tí hevur verið neyðugt at tosa við teir sum hava gjørt útstykkingina og annars kanna viðurskiftini á staðnum. Vit mangla upplýsingar frá as-built tekningum.

Innleggingar:

Kloakk: Á økinum liggur ein skittvatnsleiðing ø160mm, pvc fram við tromini til reinsiverkið við íbindingina til Glyvursvegin. Frá skittvatnskloakkini liggja stikkleiðingar til øll raðhúsini, umvegis 315 mm gjøgnumrenningarbrunnar.

Regnvatn: Dimensiónin á regnvatnsleiðingini er ókend og liggur lutvíst í vegnum og annars umvegis økið, har høllin er staðsett. Tað framgongur ikki um stikk liggja inn til raðhúsini og onki sæst til hetta á staðnum.

Brúksvatn: Á økinum liggur ein ø110mm PH, sum liggur fram við vegnum í ovaru síðu. Tað framgongur ikki um stikk liggja inn til raðhúsini og onki sæst til hetta á staðnum.

Gøtuljós: Upplýsingar um gøtuljós eru mangulfullar.

El: Á økinum liggja 2 stk. 0.4 kV leiðingar fram við vegnum. Tað framgongur ikki um stikk liggja inn til raðhúsini og onki sæst til hetta á staðnum.

Tele o.a.: Á økinum liggur bert ein tele-innføring til økið omanfyri vegin, aðrar leiðingar eru ikki og onki sæst til hetta á staðnum.

Fjarhiti: Eingin skráseting er, men Høgni Lauritsen hevur upplýst, at fjarhiti liggur fram við vegnum á niðaru síðu, oman til niðasta raðhúsið sum er bygt.

Vegurin inn:
Vegurin inn til útstykkingina er ikki liðugur. Á ovaru síðu er gongubreyt og gøtuljós, men á niðaru síðu er hvørki gongubreyt ella gøtuljós. Vegurin hevur einvegis hall og yvirflatuvatn frá vegnum rennur oman á stykkini niðanfyri, her manglar gongubreyt, kantsteinar og vegbrunnar. Vegbanin er asfalteraður, men treingir til ábøtur.

Mál nr. 2011-2140/9 er skjal sum vísir manglar í sambandi við møguliga yvirtøku av vegnum.

Samanumtøka:
Staðfestast kann, at økið millum verandi raðhús og arbeiðshøllina við innkoyringina til Kongavarða ikki er byggibúgvið. Tað sær út til at kloakkleiðingar liggja inn til húsini, men annars mangla allar aðrar innleggingar umframt at vegurin inn til økið ikki er gjørdur liðugur.

Viðvíkjandi fjarhitaskipan, má kannast eftir um tað ber til at binda í verandi fjarhitaskipan.
Rættast hevði verið um kommunan fekk til vega rættaðar tekningar av økinum (as-built), soleiðis at kommunan, saman við ráðgeva, kann gera eina meira ítøkiligari lýsing av hvørjar innleggingar eru, hvar íbindingarnar kunnu verða osv. Lættast er at arbeiða víðari við upprunaligu ætlanini hjá Valbjørn Dalsgaard, við smærri rættingum.

**2. Søla av økinum**

Polittiskt er meldað út, at ynski er um:
- at kommunan ikki skal standa fyri arbeiðingum at byggja ella gera fundament og veggir.
- at økið skal seljast til at byggja raðhús á.
- at kommunali bíðilistin ikki skal brúkast
- at stykkini og eftirfylgjandi húsaeindirnar kunnu seljast í fríðari sølu.

Alment:
Tað besta hevði verið um kommunan stóð fyri at leggja allar leiðingar inn til húsini, áðrenn útbjóðing, so hetta ikki kemur at ávirka prísin negativt.

Kommunan eigur eisini at tryggja sær at byggingin verður gjøgnumførd.

Eindir:
Alt økið kann seljast samlað til 1 keypara ella býtast sundur í t.d. 5 eindir, sum verða seld hvør sær:

| Slag | Fyrimunir | Vansar |
|---|---|---|
| **Um alt verður boðið út í einum:** | Lættari at seta treytir, tá tað bert er ein at samráðast við, ísv. sølu og bygging.<br>Stórdrift gevur møguleika fyri størri vinningi pr. hús og harvið kanska hægri prís/boð uppá lendi?<br>Kunnu biðja keyparan leggja fjarhitaskipan.<br>Seta treytir fyri liðugtgerð pr. eind t.d. at byrjað verður innast. | Færri møguligir keyparar kann gera, at eftirspurningurin/-kappingin verður minni og harvið sannlíkt lægri prísur fyri lendi<br>Váðin hjá keypara er stórri (størri kapitalbinding) ið ávirkar prísin niðureftir fyri lendi.<br>Um samstarvi haltar, so steðgar kanska alt upp. |
| **Um boðið verður út í 5 einum:** | Sannlíkt er at fleiri áhugaðir keyparar verða og harvið størri kapping og hægri prís.<br>Minni váði kann gera at vit | Fleiri partar skulu gera íbindingar í verandi leiðingar.<br>Trupult at biðja keyparar leggja fjarhitan, serliga um |

| | | |
|---|---|---|
| | fáa hægri prís.<br>Minni kapitalbinding enn um boði út samlað | eigarar ikki semjast um at gera alt í senn. |

Hvør skal selja:
Kommunan kann sjálv standa fyri søluni ella lata meklara standa fyri søluni.

| Slag | Fyrimunir | Vansar |
|---|---|---|
| **Meklari selur:** | Meklarin ger sølutilfar, samskiftur við keypara og forhandlar. Meklari kann røkka fleiri keyparum og soleiðis ber helst til at fáa hægri boð.<br>Kommunan skal ikki hugsa um hvør bjóðar og hvør skal keypa. | Tað kostar.<br>Kenna minni til keyparar og proces. |
| **Kommunan selur:** | Betur stýr á sølu og tilboðum og kann samskifta og kunna møguligar keyparar betri. | Politikkur kann koma í Ábyrgdin liggur hjá kommununi, sum eisini skal gera tilfar og samskifta. |

Um kommunan skal standa fyri søluni, er neyðugt at fáa gjørt lýsingartilfar v.m. og peningur má  avsetast til søluna.

Um meklari skal standa fyri søluni, kann roknast við, at kommunan kann fáa eitt tilboð uppá uml. 100.000 kr.

Prísur:
Roknað verður við, at meira fæst fyri økið um tað verður selt fyri hægstbjóðandi, við einum minsta prísi uppá t.d. kr. 300.000 fyri hvørja húsaeind. Eisini kann roknast við at fáa betri prís um ein eind verður seld í senn.

Um grundstykkjastøddin verður uml. 150 m2, svarar ein minstiprísur uppá kr. 300.000 til kr. 2.000 pr./m2.

Til samanlíkningar:

1) Mylnutjørn kostar  2.120 kr./m2, ella  kr. 451.681 pr/stk. liðugt planerað. (317 m2 írokna fríøki/213 m2 er byggifeltið)
2) Oman gil kostar 1381 kr/m2, ella áleið 450.000 pr/stk. liðugt planerað. (325 m2)

3) Dýrindalsgøta, kostar 2.240 kr/m2, ella áleið 336.000 pr/stk. liðugt planerað og soklarnir stoyptir.

Afturat prísinum sum verður ásettur, kemur:
- Íbindingargjald ísv byggiloyvi.
- Um bindast skal í verandi fjarhitaskipan, skal helst íbindingargjald gjaldast.
- Koma skaðar á veg, gongubreyt o.a., má eigarin gjalda fyri at fáa tað gjørt í stand aftur.

Kommunan kann selja økið óbyggibúgvið, soleiðis sum tað liggur í dag, ella kann kommunan byggibúgva økið áðrenn tað verður selt. Líka mikið hvør leistur verður valdur, so er neyðugt at gera eitt projekt av útstykkingini, sum skal góðkennast av kommununi, áðrenn arbeiðið byrjar.

<u>Hitaverk</u>
Sambært kortal, eiga verandi matriklarnir hitastøðina sum er, men tað er helst Eik sum hevur goldið støðina og ikki eigarar.

Tað er ikki upplýst um verandi hitastøð er so stór, at hon eisini kann geva hita til hesa bygningina. Hetta má kannast nærri. Verandi fjarhitaleiðing er ikki løgd oman til nýggju stykkini.

Best er at taka upp samráðingar við verandi eigarafelag um treytir fyri íbinding.

Fyrimunur við at brúka felags hitaverk er, at tað verða fleiri til at rinda fyri rakstur og viðlíkahald.

**3. Annað:**

<u>Eigarafelag:</u>
Tað vil avgjørt vera ein fyrimunur um útstykkingin verða partur av verandi eigarafelag og her eiga vit at tosa við verandi eigarafelag.

<u>Tíðarætlan:</u>
Stykkini eiga ikki at verða seld fyrr enn øll viðurskifti eru púra greit, serliga fyri tann sum skal bjóða, tí annars er vandi fyri at vit fáa lægri prísi og at málið seinni steðgar upp, tí tað er okkurt sum ikki er greitt.

Tíðarfreistir í skeytinum kunnu verða:
- Byggiloyvi skal verða fingið innan 1 ár eftir at skeytið er undirskrivað
- Byggingin skal verða byrjað innan 1½ ár eftir at skeytið er undirskrivað
- Byggingin skal verða liðug innan 3 ár eftir at skeytið er undirskrivað

<u>Formur og útsjónd:</u>

Byggingin skal í stórsta mun verða í samsvari við uppruna ætlanina hjá Valbjørn Dalsgaard viðvíkjandi tali av húsum, stødd og útsjónd.

Byggingin skal verða í samsvari við núverandi bygging, 2 hæddir umframt lága reising, og pláss skal verða fyri bilskúri, umframt at 2 p-pláss skulu verða á hvørjum grundstykki.

Byggingin skal hava somu frástøðu frá vegnum sum núverandi bygging, og ein byggilinja skal verða móti hamrinum, soleiðis at øll eru tryggjaði útsýni.

Byggivaldið tilskilar sær rætt at góðkenna tilfarsvalið.

<u>Matrikkulering:</u>
Áðrenn økið verður selt, má ein matrikkulplanur gerast. Øki má matrikkulerast til 1 ella 5 økir áðrenn endaligt skeyti verður undirskrivað og arbeiðið á staðnum fer í gongd. Sundurbýti í húsaeindir kann gerast tá brandmúrarnir eru gjørdir og góðkendir, ella í seinasta lagi áðrenn byggiváttan verður givin.

Málslýsingin omanfyri er gjørd av teknisku fyrisitingini, saman við løgdeildini.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyri nevndu lýsing, verður víst á fylgjandi møguleikar fyri at selja økið til bygging av raðhúsum:

Uppskot 1)
Um økið verður selt óbyggibúgvi soleiðis sum tað liggur, mælir tekniski stjórin til:
- at alt øki verður selt til ein keypara
- at eitt samla øki verður frámatrikkulerað at selja
- at kommunan sjálv stendur fyri søluni, herundir eisini at gera sølutilfar.
- at ein treyt við søluni verður, at keyparin skal lata inn eitt fullfíggja útstykkingarprojekt, sum m.a. vísir allar leiðingar, liðuggerð av vegi, fjarhita o.s.v. áðrenn arbeiðið byrjar.
- at tann sum hevur besta tilboðið, sum liggur omanfyri minstaprísin, vinnur útbjóðigina og at mett verður út frá prísi, tíðarætlan og konceptinum annars (kommunan skal kunna samráðast við møguleikar keyparar).

Uppskot 2)
Um økið verður selt í 5 eindum, mælir tekniski stjórin til:
- at kommunan, áðrenn sølan fer fram, kannar øll viðurskifti á staðnum og letur gera eitt fullfíggja útstykkingarprojekt av leiðingum, vegi og øðrum, sum keyparar skulu halda seg til.
- at játtaðar verða kr. 250.000 til ger av projekti
- at øki verður matrikkulerað í 5 eindir at selja
- at ein meklari kemur at standa fyri søluni, herundir eisini at gera sølutilfar.
- at eindirnar verða seldar ein og ein til hægstbjóðandi

Í báðum uppskotunum mælir tekniski stjórin til, at kommunan setir treytir í skeyti um:

- hvussu byggingin skal verða í støðd, staðseting og útsjónd
- hvussu íbinding av leiðingur og fjarhita skal verða
- tíðarætlan fyri byggingina

**Fíggjarnevnd 10. december 2014:** Útsett.

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Útsett.

# 260/14 Ásetan av fundardøgum fyri býráðið 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 11.12.2014 | 260/14 | 14/05206-1 |

**Málslýsing**:
Uppskot frá umsitingini til fundardagar:

| | |
|---|---|
| 29. januar | 17. september |
| 26. februar | 24. september |
| 19. mars | 29. oktober |
| 23. apríl | 19. november |
| 21. mai | 10. desember |
| 18. juni | |

**Býráðsfundir 11. desember 2014:** Einmælt samtykt.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:50**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina R. Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Rúni Djurhuus | Sjúrður Olsen |
| | Sigrún A. Mohr | |